

# Føroysk fiskivinna í ES

## Upprit um føroyskan limaskap í ES



# Formæli

Í 2013 legði Javnaðarflokkurin á Fólkatingi fram frágreiðingina “Ja til Evropa”.

**Tann lítla bókin var í fimm pørtum:**

- *Ein yvirskipað lýsing av teimum fyrimunum og vansum, ES hevur við sær fyri Evropa.*
- *Ein lýsing av hvat hendi tá Føroyar søgdu nei til at fylgja Danmark inn í EF í 1973.*
- *Ein lýsing av støðu Álands, sum í 1994 gjørdist limur gjøgnum Finnland.*
- *Ein lýsing av ES-orðaskiftinum í Íslandi.*
- *Ein lýsing av royndum Grønlands.*

Bókin var væl móttikin í Føroyum – men tað er eitt, sum orðaskiftið um Føroyar og ES altíð strandar á: Fiskivinnupolitikkurin.

Tað er eingin ivi um, at Føroyar kunnu fáa stórar fyrimunir av einum tættari tilknýti til ES. Um prísurin er, at vit skulu geva frá okkum rættin at reka egnan fiskivinnupolitikk, munnu tey flestu kortini aftra seg.

Men virkar felags fiskivinnupolitikkurin í praksis? Hvørjir eru møguleikarnir fyri at fáa undantøk frá honum? Hvørji undantøk kunnu vit við vissu IKKI fáa? Og hvørji nýggj rættindi kann føroysk fiskivinna fáa, um Føroyar gerast partur av ES?

Svarið uppá hetta fæst ikki, fyrr enn samráðst verður um tað. Tí var tað spell, at íslendsku samráðingarnar um limaskap steðgaðu, áðrenn komið var til kapittulin um fiskivinnuna. Ta skipan, Ísland kundi fingið, kundu Føroyar uttan iva eisini fingið.

Men eins og íslendingar gjørdu sær sínar metingar áðrenn samráðingarnar byrjaðu – í stórum lýstar í “Ja til Evropa” – kunnu vit gera okkara.

Tað hevur Javnaðarflokkurin á Fólkatingi so nú gjørt.

Hetta er ikki eitt aktuelt mál beint nú – men fyrr ella seinni kemur spurningurin um hvussu vit knýta okkum tættari at ES uttan iva á skrá aftur. Serliga um Ísland aftur fer at taka samráðingarnar upp. Og tá er betri at vita heldur enn at gita.

Henda frágreiðing er ikki neyv vitan – men heldur ikki gitingar. Talan er um kvalifiseraðar metingar, sum byggja á fakta og royndir.



## Niðurstøða

Tað er rættiliga trupult at gera eina eintýdda niðurstøðu í spurninginum, um tað er ein fyrimunur ella vansi fyri føroyska fiskivinnu, um Føroyar gerast partur av felags fiskivinnupolitikkinum hjá ES. Í fyrstu atløgu eru ein rúgva av óvissum, áðrenn spurningurin kann svarast nøktandi. Ikki fyrr enn vit eru í ítøkiligum samráðingum, vita vit, hvørjar fyritreytirnar og møguligu fyrivarnini eru. Ein annar táttur, sum ger tað torført at spáa um fyritreytirnar hjá føroyskari fiskivinnu í einum møguligum komandi ES limaskapi, er, at ES ongantíð áður hevur samráðst við eitt land, sum líkist Føroyum. Her verður sipað til okkara støðu sum pinkutjóð, atland og við fiskivinnu sum høvuðsvinnu. Í øðrum lagi er eisini ymiskt, treytað av politiskum brillum, hvat tú heldur vera fyrimunir og vansar við, at Føroyar gerast partur av felags fiskivinnupolitikkinum. Afturat hesum er ES í ferð við at endurskoða sín fiskivinnupolitikk, og stovnarnir í Brússel eru ikki lidnir við endaliga uppskotið.

Kortini ber til at gera nakrar varisligar metingar um fyrimunir og vansar. Niðanfyri er eitt stutt yvirlit yvir fyrimunirnar:

**Fyrimunir:**

- *Atgongd til onnur fiskasløg*
- *Útlendskar íløgur*
- *Menningargrunnurin stuðlar nýíløgum*
- *Landingar*
- *Atgongd til fleiri aðrar regionalar felagsskapir*
- *ES endurskoðar sín fiskivinnupolitikk*
- *Krav um at fylgja lívfrøðiligu tilráðingini hjá ICES*
- *Frælsi at varðveita einstakar serskipanir*
- *Tollurin og positivlisti burtur*
- *Atgongd til fleiri handilssáttmálar*
- *Møguleikin at lata rakstrarstudning minkar*

Yvirskipað verður føroysk fiskivinna meira liberal, um vit gerast limur í ES. Hóast vit helst sleppa at varðveita fleiri sonevndar serskipanir, ið vit í dag hava, so er greitt, at møguleikin hjá útlendingum at keypa seg inn í føroysk fiskivinnu gerst betri við limaskapi. Samstundis fella helst ásetingarnar burtur um, at tað einans ber til at landa ein ávísan part av veiðuni uttanlands. Hetta kann tryggja okkara fiskiførum ein betri prís, tá ið tey hava frælsi at landa har, tey vilja.

Tað er ein hornasteinur, at kapitalurin skal hava frítt at fara millum ES lond, og tað er valla nakar ivi um, at hetta verður eisini støðan, gerast vit limir. Fiskivinna er ein kapitaltung vinna, og tí vilja fleiri halda, at tað er ein fyrimunur, at útlendingar eru við at seta pening í og harvið taka váðan í føroyska fiskivinnu. Í sama viðfangi gerst føroysk fiskivinna meira gjøgnumskygd, tí tað er øllum greitt, at útlendskur kapitalur situr tungt á føroyskari fiskivinnu uttan mun til ásetingarnar í lógini um vinnuligan fiskiskap.



Tað er lítið, sum bendir á, at ES limaskapur fer at forða føroyingum at seta á stovn ein fiskidaga- ella kvotubanka, er áhugi fyri tí. Limalondini hava eitt rímiliga stórt frælsi sjálvi til at gera av, hvussu innlendis fiskivinnan verður skipað. Gerst fiskidaga- ella kvotubanki veruleiki, fána grundgevingarnar fyri at forða útlendskum íløgum burtur. Orsøkin er, at tilfeingi – "ogn Føroya fólks" ongantíð endaliga endar á útlendskum hondum, tí kvoturnar ella fiskidagarnir ongantíð verða latnir í meira enn eitt tíðarskeið í senn – móti gjaldi.

Føroyskir myndugleikar hava í nógv ár havt trupult við at áseta eitt veiðitrýst, sum serfrøðingarnir hava mælt. Tað er lítið at taka seg aftur í, at vinnan og politiska skipanin í Føroyum eru tætt knýtt, og hetta hevur vanliga við sær, at ásetingarnar hjá serfrøðingunum ikki verða fylgdar serliga gjølla. Hetta kravið verður hert við limaskapi í ES. Tað kann gerast ein stórur fyrimunur fyri føroyska fiskivinnu, at kravið um at fylgja ICES kemur uttaneftir, tí tá verður tað álagt okkum at fylgja serfrøðingunum. Við verandi skipan er ov lætt hjá politisku skipanini at snúgva sær undan tilráðingunum um burðardygga menning.

Mongu tvílanda fiskivinnusáttmálarnir hjá ES við serliga lond í Afrika lata eisini dyrnar upp hjá føroyskum fiskiskipum at royna eftir øðrum fiskasløgum, serliga tunfiski. Í sama viðfangi gerast vit partur – umvegis ES- av fleiri regionalum millumtjóða fiskivinnufelagsskapum, sum vit ikki eru partur av í dag.

**Tað eru kortini eisini greiðir vansar við ES-limaskapi:**

***Vansar:***

- *Útlendskar íløgur*
- *Kvotuhoppan*
- *Landingar*
- *Missa Russlandssáttmálan*
- *Fáa neyvan stórvegis fyrivarni*

Stórar útlendskar íløgur kunnu hava við sær, at føroyingar fáa ilt við at standa seg í kappingini, og at stórur partur av føroyskari fiskivinnu endar á útlendskum hondum. Hóast tað eru greiðar ásetingar um relativan stabilitet, og at hvørt limaland sær útlutar sínar kvotur, so eru dømi um sonevnda "kvotahoppan", har fiskimenn í einum ES-landi búsettu seg í øðrum ES-londum og fiskaðu av kvotunum hjá viðkomandi landi. Hetta er ein stórur vansi.

Hóast tað endaliga verður staðfest í einari samráðingartilgongd, so tykist greitt, at Føroyar fara ikki at fáa nøkur varandi fyrivarni sum partur av felags fiskivinnupolitikkinum. Tað hava hvørki lond, sum eru blivin limur ella lond, ið hava ætlað sær limaskap, megnað at fingið. Tað er eisini greitt, at okkara tvíhandilssáttmálar við Russland, Ísland og Noreg fella burtur, gerast vit limir. ES hevur ongan sáttmála við Russland í dag, so okkara kvotur í russiskum sjógvi høvdu vit mist. ES hevur bæði fiskiveiðusáttmála við Noreg og Ísland, so har skuldi verið møguleikar at javnað út missin í fiskiveiðurættindum.



Tá ið ES kemur at umboða okkum í NEAFC og øðrum millumtjóða felagsskapum, er tað ein spurningur, um tað er ein fyrimunur ella vansi. Tann mest átrokandi spurningurin er, um vit fáa minni ella meira svartkjaft, sild og makrel innan fyri ella uttan fyri ES. Hesin spurningur er ógvuliga torførur at svara ítøkiliga, tí talan er um ferðandi stovnar, so tað valdast møguliga, hvussu stór ella lítil føroyska kvotan er, tá ella um vit gerast limur í ES. Ein varlig meting er, at samlaðu kvoturnar hjá Føroyum gjørdust partur av ES-kvotuni, og at Føroyar fingu minni í sín lut, tí kappingin um ES kvotuna hevði verið stór. Hetta sjónarmið er bygt á eina leysliga meting. Hinvegin ber eisini til, at vit fáa størri part av silda- og makrelkvotuni sum ES-limur, enn vit hava sum einstakur spælari. Tað er sjálvsagt ein giting – men nakað bendir á, at einstøk ES lond ikki hava verið verri fyri í so máta av at vera partur av ES. Eitt dømi um hetta er Danmark.



# 1. Inngangur

Fiskivinnan hevur síðan fyrst í sjeyti árunum verið hjartað í føroysku ES-mótstøðuni. Fiskivinnan er uttan iva týdningarmiklasta strategiska evnið í einari samráðingartilgongd við ES. Ræðumyndirnar um stórar evropeiskar trolarar, sum trároyna fiskigrunnarnar undir Føroyum, meðan hjálparsleysu føroyingarnir einans kunnu hyggja at, hava meitlað seg fast í spaka føroyska ES-kjakið. Fiskivinnupolitikkurin hjá ES er høvuðsorsøkin til, at kjakið um okkara viðurskifti við ES nær um ongantíð kemur av fetanum. Felags fiskivinnupolitikkurin (FFP) hjá ES er stórviðurin, sum forðar og teppir alt kjak í Føroyum um møguleikarnar fyri einum ES-limaskapi.

Tað er lætt spæl hjá teimum, sum eru ímóti føroyskum limaskapi í ES. Ræðumyndir um oyddar bretskar fiskivinnubýir, eitt stórt embætisverk í Brússel, ið ikki skilir, hvussu fiskivinnan virkar og ein fiskivinnupolitikk, sum fullkomiliga er farin av sporinum, verða støðugt drignar fram, og í Føroyum er fáur, sum mutar ímóti hesum grundgevingunum.

Sama um FFP rúmar fleiri viðurskifti, sum kundu tænt føroyskari fiskivinnu, so eru hesi sjónarmið ongantíð at hoyra. Satt at siga verður ongantíð skift orð um ítøkiligu skipanirnar í FFP, og tí gerst kjakið sjáldan serliga væl grundað. Nær hoyra vit, hvørjar møguleikar føroysk fiskivinna hevur at endurnýggja við pengum úr menningargrunninum, sum er partur av FFP? Verður størri gjøgnumskygni í eigaraviðurskiftinum, og sleppa vit undan útlendskum strámonnum, gerast vit partur av FFP? Fáa vit eitt sterkari og neyvari eftirlit við okkara stovnum? Verður okkara kvota í Barentshavinum størri, um vit gerast limur í ES?

Hesar og nógvar aðrar spurningar kjakast vit sjáldan um. Sjálvt innihaldið í FFP koma vit ongantíð til. Brúka vit eitt akademiskt hugtak, so hevur mótstøðan móti FFP fingið eina so sterka hegemoniska støðu í føroyska kjakinum, har grundgevingarnar ímóti FFP standa so sterkar, at onnur sjónarmið hava ongan møguleika at vinna frama.

Tað er kortini einki at taka seg aftur í, at FFP hevur virkað stak illa á fleiri økjum, síðani hann varð settur á stovn í 1983. Í stuttum vísa hagtølini, at 80 prosent av stovnunum í Evropa eru ovfiskaðir. Hetta kemst fyrst og fremst av, at skipini eru ov stór, ov effektiv og alt ov nógv í mun til at tryggja eina burðardygga veiðu. Tað vísir seg eisini vera sera trupult at fáa haldgóðan rakstur í evropeisku fiskivinnuna, sum ikki hevur víst seg at vera tann stóri fíggjarligi vinningurin. Tað er ikki at taka munnin ov fullan at siga, at uttan stóra statsstuðulin høvdu nógv í fiskivinnuni als ikki havt nakað yvirskot.[1]

Tá tað er sagt, so tykist tað sum, at í Føroyum eru vit nakað skjót at bara at dálka fiskivinnuumsitingina í ES og gloyma at hyggja inneftir. Myndaliga verður okkara egni fiskivinnupolitikkur í ES-høpi konstrueraður sum tann fullkomni, meðan fiskivinnupolitikkurin hjá ES er fullkomiliga miseydnaður.



**1** *NOTAT – magasin om demokrati og Europa, marts 2012*

Men er føroysk fiskivinna nøkur sólskinssøga?

Heldur tvørturímóti. Tað eru nøkur álvarsom sjúkueyðkenni í okkara høvuðsvinnu. Seinastu mongu árini hevur fiskivinnan á sjónum havt hall. Botnfiskaveiðan er metlág, serliga hjá toskinum og hýsuni. Fiskivinnan á landi hevur eisini havt hall seinastu mongu árini. Niðanfyri er ein mynd av gongdini seinastu 10 árini.[2]

Indikatorar fyri føroyskan fiskiskap, jan-03 til mai-13 Mynd 14




Ein annar trupulleiki er, at føroyski flotin verður ikki endurnýggjaður, og fíggjarstovnarnir halda hondina yvir fleiri reiðaríum. Tað er eisini trupult hjá nýggjum fiskivinnuspírum at sleppa framat, tí krøvini til fígging eru sera hørð. Tað er eisini sera trupult at sleppa framat loyvunum.

Hóast tað ikki er ein trupulleiki í sær sjálvum, gerast tað støðugt færri føroyskir fiskimenn í flotanum. Útlendskir láglønarfiskimenn vinna fram. Útlendingar hava stóran strategiskan áhuga í okkara fiskirættindum umvegis strámenn í Føroyum. Tøknilig framstig gera, at flotin miðsavnast, og eftirhondini kunnu reiðaríini teljast á einari hond. Fiskiveiðueftirlitið verður støðugt skert, og revsimøguleikarnir eru alt ov avmarkaðir. Tað er lítið, sum bendir á, at vit fáa nakað nýtt og framkomið fiskivinnurannsóknarskip í bræði. Fleiri og fleiri fiskimenn rýma til Noregs ella fara í frálandavinnuna. Síðst, men ikki minst, so er skuldin í flotanum trífaldað seinastu árini, helst orsakað av stórum sølum av loyvum.

Hesir grundleggjandi trupulleikarnir í okkara egnu fiskivinnu eiga at lata upp fyri møguleikanum at hyggja nærri at, hvussu okkara egna fiskivinna hevði sæð út, um Føroyar gjørdust partur av felags fiskivinnupolitikkinum. Hetta er eyðvitað ein hugsað framtíðarmynd – eitt scenarie, sum ikki tekur støði í nøkrum ítøkiligum politiskum veruleika, men heldur vísir á, hvørjar møguleikar, avbjóðingar og avmarkingar føroysk fiskivinna hevði havt, um Føroyar fóru undir eina tilgongd at gerast limur í ES.

**2** *Frágreiðingin hjá Búskaparráðnum september 2013*



Hygga vit nærri at hugsaðu framtíðarmyndini, har Føroyar fara undir eina tilgongd, sum skal tryggja okkum ES-limaskap, so stinga fleiri grundleggjandi spurningar seg upp alt fyri eitt:

- *Varðveita vit yvirvaldsrættin til fiskatilfeingi í føroyskum sjógvi?*
- *Sleppa fiskifør ótálmað at royna undir Føroyum?*
- *Fara Føroyar sum partur av ES at fáa veiðurættindi, sum tryggja føroysk áhugamál?*
- *Kunnu ES-borgarar frítt gera íløgur í føroyska fiskivinnu og fiska av føroyskum kvotum?*
- *Ber til at fáa varandi undantøk frá grundreglunum í fiskivinnupolitikkinum hjá ES?*

Hesir spurningar eru torførir at viðgera og svara í einum uppriti. Ítøkilig og haldgóð svar fáast bert í samráðingum. Kortini ber til at gera nakrar haldgóðar metingar út frá royndunum hjá øðrum londum, sum eru limir í ES og øðrum londum, sum hava verið í einari samráðingartilgongd.



# 2. Bakgrund: Fiskivinnan í ES

Samlaða fiskivinnan í ES er triðstørst í øllum heiminum. Fiskivinnan hevur ikki avgerandi týdning í samlaða búskapinum hjá ES. Samlaða veiðan og framleiðslan er á leið 6,9 mió. tons um árið. Fiskivinnan á sjógvi og framleiðslan á landi er arbeiðsplássið hjá sløkum 400.000 fólkum í Evropa[3].

Í heimshøpi er ES ein lítil spælari. Tey 28 limalondini standa fyri á leið 5 prosentum av samlaðu veiðuni og framleiðsluni í øllum heiminum[4]. Kina er við sínum sløkum 35 prosentum nógv tann størsta fiskivinnutjóðin í heiminum. India, Peru og Indonesia eru tjóðir, sum standa fyri á leið sama parti, sum ES ger.




Evropeiski fiskiflotin fiskar at kalla kring allan knøttin. Størsti parturin av samlaðu veiðuni hjá ES er úr Miðalhavinum og úr landnyrðingspartinum av Atlantshavinum, har tað serliga verður fiskað svartkjaftur, sild og brislingur. Niðanfyri sæst býtið hvørji fiskasløg ES-skip veiða (2009)[5]:

---

*3 http://fvm.dk/fiskeri/eus-fiskeripolitik/*

*4 Den fælles fiskeripolitik i tal*

*5 Ibid*

| | | |
|---|---|---|
| Brisling | 543 389 | 11 % |
| Atlantisk sild | 531 443 | 10 % |
| Alm. makrel | 346 850 | 7 % |
| Tobis | 339 270 | 7 % |
| Europæisk sardin | 243 359 | 5 % |
| Cunene-hestemakrel | 172 672 | 3 % |
| Hestemakrel | 154 813 | 3 % |
| Atlantisk torsk | 127 189 | 3 % |
| Bugstribet bonit | 114 490 | 2 % |
| Chilensk hestemakrel | 110 731 | 2 % |
| Ansjos | 102 212 | 2 % |
| Rund sardinel | 86 935 | 2 % |
| Blåhvilling | 85 158 | 2 % |
| Kulmule | 84 384 | 2 % |
| Hvid tun | 72 244 | 1 % |



Sum yvirlitið vísir, eru rættiliga nógv fiskasløg, sum føroyingar fiska, ikki serliga sjónlig í yvirlitinum. Her verður fyrst og fremst hugsað um botnfiskaveiðuna, har serliga toskur, hýsa og upsi fylla nógv í Føroyum. Seinnu árini hevur uppsjóvarfiskurin veruliga tikið dik á seg undir Føroyum, og sum yvirlitið vísir, fiska evropearar heilt fitt av serliga sild og makreli. Innanhýsis í ES fylla hesi fiskasløg nógv í serliga Skotlandi, Hetlandi, Hollandi, Írlandi, Spania og Danmark.

Tær størstu fiskivinnutjóðirnar í ES eru Danmark, Frakland, Bretland og Spania. Hesi fýra lond standa fyri meir enn helminginum av allari framleiðsluni. Tað er vert at leggja til merkis, at Danmark er største fiskiveiðutjóð í ES, men er einans triðstørst í Evropa eftir Noreg og Ísland.[6] Tilsamans hava Noreg og Ísland eina veiðu, sum svarar til heili 70 prosent av samlaðu veiðuni hjá ES-londunum.

Í 2011 vóru í alt 185 feløg í 17 ES-londum, sum framleiddu fisk. Samlaða virðið er 20 milliardir evrur. Spania, Ongland, Frakland og Týskland eru størstu framleiðararnir. Talan er um í alt 3.700 virkir og 120.000 fólk.[7]

Noreg, Kina, Ísland og Vjetnam eru londini, sum útflyta mest fisk til ES. Av innflutninginum hjá ES stava heili 22 prosent frá Noregi. Innanhýsis í ES innflyta Spania, Frakland og Italia mest, meðan Danmark, Holland og Spania útflyta mest.

***6** Ibid*

***7** Ibid*



### Vigtigste leverandører til EU

| | | | |
|---|---|---|---|
| Norge | 3 678 819 | **22%** | |
| Kina | 1 521 839 | **9%** | |
| Island | 913 653 | **6%** | |
| Vietnam | 859 350 | **5%** | |
| Marokko | 813 925 | **5%** | |
| Thailand | 809 298 | **5%** | |
| USA | 772 599 | **5%** | |
| Ecuador | 683 120 | **4%** | |
| Argentina | 615 628 | **4%** | |
| Indien | 537 747 | **3%** | |
| Peru | 463 958 | **3%** | |
| Øvrige tredjelande | 4 888 222 | **30%** | |



I alt: 16 558 158

### EU vigtigste kunder

| | | |
|---|---|---|
| USA | 305 930 | **11%** |
| Schweiz | 251 355 | **9%** |
| Rusland | 227 651 | **8%** |
| Norge | 224 404 | **8%** |
| Kina | 212 649 | **8%** |
| Japan | 180 316 | **7%** |
| Nigeria | 148 964 | **5%** |
| Egypten | 111 187 | **4%** |
| Marokko | 106 010 | **4%** |
| Hongkong | 81 221 | **3%** |
| Ukraine | 59 412 | **2%** |
| Øvrige tredjelande | 862 918 | **31%** |



I alt: 2 772 017

### Medlemsstater med den største import fra tredjelande

| | | |
|---|---|---|
| ES | 3 116 904 | **19%** |
| SE | 1 933 886 | **12%** |
| DE | 1 818 711 | **11%** |
| UK | 1 833 947 | **11%** |
| IT | 1 642 110 | **10%** |
| DK | 1 564 466 | **9%** |
| FR | 1 522 090 | **9%** |
| NL | 1 194 586 | **7%** |
| Øvrige medlemsstater | 1 931 458 | **12%** |



*Kilde:* Eurostat.

EU-27 i alt: 16 558 158

### Medlemsstater med den største eksport til tredjelande

| | | |
|---|---|---|
| ES | 560 653 | **20%** |
| NL | 447 088 | **16%** |
| DK | 381 708 | **14%** |
| UK | 342 800 | **12%** |
| FR | 247 870 | **9%** |
| DE | 197 464 | **7%** |
| IT | 92 818 | **3%** |
| IE | 79 629 | **3%** |
| Øvrige medlemsstater | 421 987 | **15%** |



EU-27 i alt: 2 772 017

ES-londini innflyta væl meira fisk, enn tey útflyta. Limalondini innflyta mest botnfisk, men eisini er ein fittur partur uppsjóvarfiskur og skeljafiskur. Tað er einki at taka seg aftur í, at ES útflytur nógv mest uppsjóvarfisk.[8]

### Handel med produkter fra fiskeri og akvakultur mellem EU og tredjelande (2010)

(mængder i tons og værdi i 1 000 EUR)

**Mængde i tons**
**Værdi i 1 000 EUR**

| | Import: Mængde i tons | Import: Værdi i 1 000 EUR | Eksport: Mængde i tons | Eksport: Værdi i 1 000 EUR |
|---|---|---|---|---|
| Pelagiske arter | 1 103 033 | 2 484 748 | 1 038 702 | 992 313 |
| Laksefisk | 630 879 | 3 128 314 | 62 877 | 339 839 |
| Andre fisk | 1 675 602 | 4 811 173 | 309 058 | 759 251 |
| Skal- og bløddyr | 1 308 165 | 5 517 499 | 127 962 | 436 811 |
| Produkter ikke til menneskeføde | 618 510 | 616 425 | 200 475 | 243 803 |
| **EU-27 i alt** | **5 336 189** | **16 558 158** | **1 739 074** | **2 772 017** |

- Tun, sardin, makrel, sild, ansjos osv.
- Laks, ørred.
- Torsk, kulmule, sej, kuller, pangahavrude, tunge, hellefisk, guldbrasen osv.
- Reje, jomfruhummer, kammusling, musling, sepiablæksprutte, blæksprutte osv.
- Produkter, der ikke er beregnet til menneskeføde, fiskemel, prydfisk.

*Kilde:* Eurostat.

Hagtølini vísa, at tað eru fyrst og fremst Spania og Pólland, sum fáa stuðulin úr menningargrunninum, sum veitir stuðul til millum annað upphøgging, alivinnu, burðardygga menning hjá strandalondum og annan tekniskan stuðul. Sambært myndini niðanfyri, fær Spania í alt 26 prosent (1.131.891 kr), meðan Pólland fær 17 prosent av stuðlinum (734.093 kr.).[9]

*8 Ibid*

*9 Ibid*



**EF-støtte til fiskerisektoren – Fordeling på medlemsstater i programmeringsperioden 2007-2013 – Pr. akse**

(i 1 000 EUR)

| | Akse 1 | Akse 2 | Akse 3 | Akse 4 | Akse 5 | I alt pr. land | % pr. land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| BE | 11 562 | 3 500 | 7 988 | 1 900 | 1 312 | 26 262 | 0,61 % |
| BG | 8 001 | 36 004 | 20 002 | 12 001 | 4 000 | 80 010 | 1,86 % |
| CZ | 0 | 11 927 | 13 824 | 0 | 1 355 | 27 107 | 0,63 % |
| DK | 40 365 | 37 650 | 36 515 | 12 461 | 6 684 | 133 675 | 3,11 % |
| DE | 7 491 | 54 913 | 70 236 | 18 554 | 2 517 | 153 711 | 3,57 % |
| EE | 15 265 | 24 584 | 21 210 | 19 282 | 4 228 | 84 568 | 1,97 % |
| IE | 34 766 | 0 | 6 000 | 1 501 | 0 | 42 267 | 0,98 % |
| EL | 77 272 | 59 690 | 32 320 | 33 300 | 5 250 | 207 832 | 4,83 % |
| ES | 439 496 | 307 066 | 314 440 | 50 754 | 20 135 | 1 131 891 | 26,31 % |
| FR | 65 021 | 54 179 | 88 499 | 5 700 | 2 653 | 216 053 | 5,02 % |
| IT | 161 250 | 106 086 | 106 086 | 16 974 | 33 947 | 424 343 | 9,86 % |
| CY | 5 200 | 3 250 | 9 924 | 1 000 | 350 | 19 724 | 0,46 % |
| LT | 7 553 | 28 111 | 9 684 | 6 694 | 2 672 | 54 713 | 1,27 % |
| LV | 26 197 | 49 330 | 27 354 | 17 173 | 4 961 | 125 016 | 2,91 % |
| HU | 0 | 24 164 | 8 944 | 0 | 1 743 | 34 851 | 0,81 % |
| MT | 2 175 | 1 708 | 4 095 | 0 | 395 | 8 372 | 0,19 % |
| NL | 16 913 | 7 379 | 16 903 | 4 987 | 2 395 | 48 578 | 1,13 % |
| AT | 0 | 5 164 | 50 | 0 | 45 | 5 259 | 0,12 % |
| PL | 140 510 | 162 873 | 159 095 | 234 910 | 36 705 | 734 093 | 17,06 % |
| PT | 62 865 | 74 187 | 83 408 | 17 403 | 8 622 | 246 485 | 5,73 % |
| RO | 9 975 | 105 000 | 30 000 | 75 000 | 10 739 | 230 714 | 5,36 % |
| SI | 2 164 | 7 141 | 7 574 | 2 164 | 2 597 | 21 640 | 0,50 % |
| SK | 0 | 11 432 | 1 464 | 0 | 684 | 13 580 | 0,32 % |
| FI | 3 445 | 16 990 | 14 784 | 3 606 | 624 | 39 449 | 0,92 % |
| SE | 13 666 | 10 933 | 19 133 | 8 200 | 2 733 | 54 665 | 1,27 % |
| UK | 39 635 | 33 590 | 49 621 | 11 598 | 3 384 | 137 828 | 3,20 % |
| **I alt pr. akse** | **1 190 789** | **1 236 850** | **1 159 156** | **555 161** | **160 731** | **4 302 686** | |
| **I alt i %** | **27,68 %** | **28,75 %** | **26,94 %** | **12,90 %** | **3,74 %** | **100,00 %** | **100,00 %** |

*NB:* Ikke relevant for LU.

*Kilde:* Operationelle programmer vedtaget af Kommissionen. Seneste ajourføring: 24.1.2012.



## 3. Felags fiskivinnupolitikkur

ES-londini samtyktu í 1983 karmarnar um fiskivinnupolitikkin, sum framvegis er grundarlagið undir fiskiveiðustýringini í ES. Politikkurin varð endurskoðaður í 1992, 2002 og nú aftur í 2013.

Limalondini hava framvegis myndugleika á ávísum økjum, men sum tað liggur í orðinum, so merkir felags fiskivinnupolitikkurin, at limalondini hava latið felags stovnum í ES avgerðarrættin í nógvum týðandi fiskivinnumálum.[10] Skulu vit gera eitt stutt yvirlit yvir býtið av myndugleika í fiskivinnumálum millum ES og limalondini, er hetta tað[11]:

**ES:**

- *Samráðingar við triðjalond um veiðurættindi.*
- *Áseting av MLV og kvotum fyri felags stovnar.*
- *Áseting og tilluting av kvotum til limalondini.*
- *Tekniskar reguleringar: Meskavídd, minstamál, hjáveiða, stongdar leiðir, friðaðar gýtingarleiðir.*
- *Eftirlit: Veiðudagbók, veiðufráboðan.*
- *Marknaðarskipan.*
- *Karmarnar um tilluting av menningarstuðil til limalondini.*

**Limalondini:**

- *Innanhýsis býtið av tillutaðari kvotu frá ES.*
- *Nationalar fiskiloyvisskipanir.*
- *Reguleringar av lokalum fiskastovnum.*
- *Bráðneyðug tiltøk fyri at verja fiskastovnar innan fyri 200 fjórðingar.*
- *Strangari reguleringar fyri egnar fiski- og útróðrarmenn í egnum havøki ella øðrum fiskileiðum enn tær, sum ES ásetur.*
- *Eftirlit við egnum fiskiførum, fiskiførum úr øðrum limalondum og triðjalondum á egnum fiskileiðum.*
- *Kvotueftirlit fyri egin fiskifør í ES-sjógvi.*
- *Stuðulsveitingar til fiskivinnuna innan fyri karmar av Rom sáttmálanum.*

---

***10*** *Iceland, Norway and the EC Common Fisheries Policy, s. 14*

***11*** *Endurgivið úr Bláa álitinum, s. 67*



**Felags fiskivinnupolitikkurin hjá ES fevnir um trý høvuðsøki:**
Fiskiveiðupolitikkin, marknaðarpolitikkin og menningarpolitikkin.

***Fiskiveiðupolitikkurin*** setur karmarnar fyri stovnsrøkt og fiskiveiðustýring í ES-havinum. Heildarkvoturnar verða býttar út til limalondini eftir einum føstum býtislykli, sum tryggjar hvørjum landi sín fasta prosentpart. Limalondini avgera sjálvi, hvussu tey býta sína kvotu víðari til egnar fiski- og útróðrarmenn.

Ein av grundreglunum í felags fiskivinnupolitikkinum er, at ES-borgarar skulu hava javnbjóðis rætt til fiskileiðirnar í ES-sjógvi.[12] Henda grundregla er staðfest bæði í lógarverki og úrskurðum hjá ES-dómstólinum. Hetta merkir kortini ikki, at øll hava frítt at fara á fiskileiðunum hjá ES. Øðrumegin merkir frí atgongd ikki, at limalondini kunnu fiska frítt allastaðni. Fiskastovnar, ið eru MLV-reguleraðir, og kvotur býttar út á limalondini kunnu bert fiskifør fiska, um flaggstaturin hevur fingið tillutað kvotu av viðkomandi fiskaslag. Sostatt kunnu fiskifør úr limalondum, sum ikki hava fingið kvotur, bert fiska eftir ókvoteraðum fiskasløgum ella stovnum, har MLV ikki er býtt út til limalondini.[13] Í dag eru MLV kvotur ásettar fyri nærum allar fiskastovnar av vinnuligum áhuga.

Hinumegin eru nøkur undantøk í ES-lóggávuni, ið avmarka møguleikarnar á ávísum leiðum í ES-sjógvi: Eitt nú strandaleiðirnar úr 12 fjórðingum, kassar og ein felags fiskiloyvisskipan[14]. Við føroyskum eygum er tað serliga áhugavert, at limalondini hava heimild at regulera fiskiskapin sjálvi innan fyri 12 fjórðingar. Avmarkingarnar á hesum leiðum hava til endamáls at verja útróðurin. Henda skipan byrjaði sum ein fyribils skipan, men hon er síðani blivin meira ella minni endalig. Skipanin er fyrst og fremst ætlað landspørtum, sum hava fiskivinnu sum høvuðsvinnu, eins og Føroyar.

ES-limalondini hava eina felags kvotuskipan. Kvotabýtið varð í sínari tíð gjørt eftir einum leisti, sum bygdi á tríggjar fyritreytir:

- *søgulig veiðutøl*
- *tann týdning fiskivinnan hevur fyri lond ella øki í einum ávísum landi*
- *mist veiðurættindi, tá ið triðjalond fluttu fiskimarkið í sínari tíð*

---

***12*** *Et market for Fisk? Om EFs fiskeripolitikk og norsk fiskerinæring, s. 42*

***13*** *Endurgivið úr Bláa álitinum, s. 71*

***14*** *Iceland, Norway and the EC Common Fisheries Policy, s. 33*



Endamálið við kvotubýtinum er at tryggja limalondunum relativt stabil veiðurættindi. Grundreglan um relativan stabilitet merkir, at hvørt limaland fær ein fastan prosentpart av ES-heildarkvotuni sambært býtislyklinum, sum ES-londini á fyrsta sinni komu ásamt um í 1983.[15]

Mannagongdin er, at ES-ráðið hvørt ár ásetir mest loyvdu veiðu (MLV) fyri teir fiskastovnar í ES-sjógvi, sum hava vinnuligan týdning. Grundarlagið fyri MLV eru tilmæli frá ES-Kommissiónini eftir tilmæli frá ICES, og MLV verður ásett fyri hvønn einstakan fiskastovn.

Myndugleikin í kvotamálum er sum áður nevnt í tveimum: ES ásetir mest loyvdu veiðu (MLV) fyri fiskastovnarnar í ES-sjógvi og býtið av MLV millum limalondini sambært fasta prosentvísa býtislyklinum. Limalondini avgera sjálvi, hvussu tillutaðar heildarkvotur verða býttar innlendis.

Fleiri úrskurðir hjá ES-dómstólinum merkja, at felags kvotuskipanin ikki longur er nøkur trygd fyri, at limalondini kunnu varðveita sín part av fiskatilfeinginum hjá ES, sum meginreglan um relativan stabilitet leggur upp til. Kvoturnar verða framvegis tillutaðar teimum einstøku londunum, men í dag er eingin trygd fyri, at tað eru fiski- og útróðrarmenn í viðkomandi limalandi, sum einsamallir sleppa at fiska kvoturnar. Hetta er kjarnin í úrskurðinum hjá ES-dómstólinum í málinum um "kvotuhoppan" seinast í áttatiárunum.[16] Í stuttum snúðu hesi mál seg um, at fiskimenn úr einum ES-landi búsettu seg í øðrum ES-londum og fiskaðu av kvotunum hjá viðkomandi landi. Hetta varð annaðhvørt gjørt við at stovna feløg í viðkomandi landi og at skráseta fiskifør har ella við at keypa fiskifør, sum longu stóðu í skipaskrásetingini har. Bretar royndu í áttatiárunum at steðga hesi mannagongd við at herða reglurnar um manning, rakstur og ognarviðurskifti, men spaniumenn hildu bretska stigið vera í andsøgn við meginreglurnar í ES-samstarvinum og løgdu málið fyri ES-dómstólin. Niðurstøðan hjá dómstólinum var, at vinnurekandi í einum ES-landi kunnu skráseta skip síni í einum øðrum ES-landi og fiska av kvotum, sum viðkomandi land hevur fingið tillutað sambært býtislyklinum í felags fiskiveiðupolitikkinum. Henda mannagongd verður rópt kvotuhoppan, og hevur serliga verið brúkt av spaniumonnum, ið hava skrásett skip síni í Írlandi og Bretlandi og fiska av kvotum hjá hesum londum.[17]

Ábyrgdin fyri fiskiveiðureftirlitinum í ES er tvíbýtt. Limalondini hava veiðueftirlit á heimaleiðum- og havinum. Strandalandið hevur eftirlit við, at tær teknisku ásetingarnar verða hildnar, veiðudagbøkur, veiðueftirlit umborð á fiskiførum, eftirlit við landinum o.s.fr. Flaggstaturin heldur eftirlit við heildarkvotunum hjá viðkomandi landi og hevur skyldu at steðga fiskiskapinum, tá ið heildarkvotan er fiskað. ES-nevndin hevur heimild at steðga fiskiskapinum, um veiðutølini frá limalandinum vísa, at kvotan er uppi. ES hevur harumframt eitt lið av eftirlitsfólki, sum skulu ansa eftir, at eftirlitið í limalondunum virkar.[18]

---

***15*** *Den fælles fiskeripolitik – en bruger vejledning, s. 6*

***16*** *The Evolution of the CFP, working paper series, s. 62*

***17*** *Reyða Álitið s. 130*

***18*** *Den fælles fiskeripolitik – en bruger vejledning, s. 17*



Høvuðsendamálið við felags marknaðarskipanini fyri fisk og fiskavørur í ES er at tryggja fiskimonnum javnar inntøkur og at tryggja, at tann fiskurin, sum kemur á marknaðin er av góðari dygd. Marknaðarskipanin fevnir um fýra høvuðstættir: felags handilsnormar, felags prísskipan, produsentfeløg og reglur fyri samhandilin við triðjalond. Marknaðarpolitikkurin er ein skipan við innanhýsis fríhandli við fiski og fiskavørum og felags tolli mótvegis triðjalondum. Í ES-londunum verður meginparturin av fiskinum seldur um uppboðssølur, sum er ein av grundvøllunum í marknaðarskipanini. Kortini leggur felags prísskipanin seg út í ta fríu prísásetingina. Hetta verður partvíst gjørt við at stýra handlinum við triðjalond og við afturtøku-skipanini. Afturtøkuskipanin kemur inn í myndina, tá marknaðarprísurin fer niður um eitt frammanundan ásett mark. Tá verður fiskur tikin burtur av marknaðinum við stuðli frá ES. Hugsanin er, at minni útboð av fiski hevur við sær, at prísirnir aftur hækka. Avtøkuskipanin hevur sum endamál at tryggja fiskimonnum javnar og støðugar prísir.[19]

Í felags fiskivinnupolitikkinum hevði bygnaðarpolitikkurin sum høvuðsendamál at laga veiðuflotan eftir fiskatilfeinginum. Gongdin síðani hevur greitt víst, at tørvurin á einum bygnaðarpolitikki við hesum endamáli hevur verið átrokandi. Hetta komst serliga av, at Spania og Portugal fóru upp í ES í 1986, tí tá vuksu trupulleikarnir við ov stórari veiðuorku.[20]

ES-studningurin til menningartiltøk í fiskivinnuni hevur til endamáls at fáa varandi og burðardygga javnvág millum tilfeingi og veiðuorku: At bøta um kappingarførið og menna lønandi fyritøkur í fiskivinnuni og at bøta um tilgongdina og tilvirkingina av fiski- og havbúnaðarvørum.

Treytin at fáa stuðul úr menningargrunninum hjá ES er, at limalandið sendir ES eina nasjónala vinnuætlan og umsókn um stuðul. Hin treytin fyri at fáa stuðul úr menningargrunninum er, at limalandið eisini leggur til. Her kann talan vera um stuðul, sum svarar til úr 5 prosent upp í 50 prosent av íløgukostnaðinum.

---

***19*** *Bláa álitið s. 83*

***20*** *Et market for Fisk? Om EFs fiskeripolitikk og norsk fiskerinæring, s. 42*



Síðan 1995 hevur fiskivinnan havt sín egna menningargrunn. Í 2006 varð eitt nýtt fíggingaramboð tøkt. Tann nýggi grunnurin hevur eina fíggjarætlan á 3,8 milliardir evrur, og stuðul verður veittur til millum annað:

- *At taka fiskifør úr vinnuni*
- *At stuðla alivinnu*
- *Bygging og nútímansgerð av fiskiførum*
- *Vernd av strandaleiðum*

***Fiskivinnuavtalur:***
Tann evropeiski flotin hevur eina sterka siðvenju at fiska uttan fyri sjómarkið hjá ES. Í dag fiskar ES-flotin á leið 40 prosent av sínari veiðu í tonsum uttan fyri ES- sjógv, og 20 prosent av hesum er uppsjóvarfiskur.[21]

Myndugleikin í sambandi við avtalur við triðjalond um fiskiskap í ES-sjógvi og um fiskiskap hjá ES-londum í triðjalandssjógvi liggur hjá ES og ikki hjá teimum einstøku limalondunum. Endamálið við triðjalandsavtalunum er at gera tað møguligt hjá ES-flotanum at troyta grunnarnar hjá triðjalondum, har tey ikki sjálvi megna at fiska alt tilfeingið.

Søguliga var grundreglan í teimum fiskiveiðuavtalum, sum ES gjørdi við triðjalond, at tað, sum ES letur í rættindum, skal svara til tað, ES fær, annaðhvørt roknað í tonsum ella í virði. Síðani eru aðrar avtalur gjørdar, millum annað avtalur við fíggjarligum gjaldi, marknaðaravtalur og sonevndar 2. ættarliðsavtalur.

Síðan sjeytiárini hava Føroyar og Noreg gjørt fiskiveiðusáttmála við ES. Fyrst í nítiárunum varð avtala eisini gjørd við Ísland. Avtalurnar verða í ES høpi róptar tær "norðaru avtalurnar". Aðaltátturin í føroysku fiskivinnuavtaluni er, at ES og Føroyar á hvørjum árum avtala sínámillum fiskiskap. Umframt bilateralu avtalurnar er eisini multilateralt samstarv – strandalandasamráðingarnar. Hesar avtalur fevna um pelagisku fiskasløgini: Sild, makrel og svartkjaft.



**21** *Den fælles fiskeripolitikk – en brugervejledning s. 26*

Avtalurnar við fíggjarligum gjaldi eru serliga galdandi fyri afrikonsk lond, sum vilja menna sína fiskivinnu við hjálp úr Evropa. Marknaðaravtalurnar geva ES-veiðurættindi í einum landi, móti at viðkomandi land fær betri marknaðarsømdir á ES -marknaðinum. Eitt dømi um slíka avtalu er avtalan við Grønland. Eitt yvirlit kann síggjast niðanfyri[22]:




| Aftaler om flere arter (»blandede«) | Tunaftaler – Vestafrika | Tunaftaler – Det Indiske Ocean | Tunaftaler – Stillehavet | »Sovende« aftaler* | De nordlige aftaler |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 Grønland | 4 Kap Verde | 7 Comorerne | 12 Kiribati | 15 Gabon | 20 Færøerne |
| 2 Guinea-Bissau | 5 Côte d'Ivoire | 8 Madagaskar | 13 Mikronesien | 16 Gambia | 21 Island |
| 3 Mauretanien | 6 Sao Tome og Principe | 9 Mauritius | 14 Salomonøerne | 17 Ækvatorial-Guinea | 22 Norge |
| | | 10 Mozambique | | 18 Marokko | |
| | | 11 Seychellerne | | 19 Senegal | |
| | | | | * Dette er aftaler, hvor der ikke findes nogen protokol. | |

*22 Den fælles fiskeripolitik i tal*

*Regionalt samstarv:*
ES er partur av fleiri millumtjóða regionalum fiskiveiðufelagsskapum. Millum hesar teljast NEAFC og NAFO, sum Føroyar eisini eru partur av. Í hesum felagsskapum umboðar ES øll limalondini. Tað eru í dag 20 millumtjóða regionalir felagsskapir, sum eru at finna kring allan heim. Limirnir í teimum ymisku felagsskapunum eru strandalond, sum eru í teimum ymisku regiónunum.

ES er umboðað í seks felagsskapum, sum ítøkiliga taka sær av tun fiskiskapi. Niðanfyri er eitt yvirlit yvir hvørjar millumtjóða felagsskapir, ES er partur av[23]:




**Regionale fiskeriforvaltningsorganisationer for stærkt vandrende fiskebestande (tun og beslægtede arter)**

| | |
|---|---|
| **CCSBT** | Kommissionen for Bevarelse af Sydlig Tun |
| **IATTC** | Den Interamerikanske Kommission for Tropisk Tunfisk |
| **ICCAT** | Den Internationale Kommission for Bevarelse af Tunfiskebestanden i Atlanterhavet |
| **WCPFC** | Fiskerikommissionen for det Vestlige og Centrale Stillehav |
| **IOTC** | Kommissionen for Tunfiskeriet i Det Indiske Ocean |




**Regionale fiskeriforvaltningsorganisationer for andre arter end tun**

| | |
|---|---|
| **CCAMLR** | Kommissionen for bevarelse af de marine levende ressourcer i Antarktis |
| **CCBSP** | Konventionen om bevaring og forvaltning af sej-ressourcer i det Centrale Bering-hav |
| **GFCM** | Den Almindelige Kommission for Fiskeri i Middelhavet |
| **NEAFC** | Kommissionen for Fiskeriet i Det Nordøstlige Atlanterhav |
| **NASCO** | Organisationen til bevarelse af Laksebestanden i Nordatlanten |
| **NAFO** | Organisationen for Fiskeriet i det Nordvestlige Atlanterhav |
| **SEAFO** | Organisationen for Fiskeriet i det Sydøstlige Atlanterhav |
| **SPRFMO** | Den Regionale Fiskeriforvaltningsorganisation for Det Sydlige Stillehav (under oprettelse) |
| **SIOFA** | Fiskeriaftale for det sydlige Indiske Ocean |

*Kilde:* Europa-Kommissionen – Eurostat/GISCO. For de administrative grænser: © EuroGeographics, © FAO (FN), © TurkStat.

---

***23** ibid*



## 4. Fiskivinnan skal endurskoðast

Felags fiskivinnupolitikkurin hjá ES hevur dumpað. Málið um búskaparliga, umhvørvisliga og sosiala burðardygd í havsins tilfeingi er als ikki rokkið. Onkursvegna hava stýringsamboðini ikki tryggjað haldgóða stovnsrøkt ella lønsemi í vinnuni. Avgerðirnar í Brússel og hjá limalondunum hava í alt ov stóran mun verið merktar av stuttskygdum løtuvinningi heldur enn at hugsa langtíðar, og hvat tænir seg frægast fyri allar partar. Eitt ítøkiligt úrslit er, at MLV á hvørjum ári verður sett ov høgt.

Fiskiveiðupolitikkurin, sum ES hevur ført síðan 1983, hevur ikki megnað at forða ovfisking og kreppu í fiskivinnuni. ES vil vera við, at meira enn 80 prosent av stovnunum í Evropa eru ovfiskaðir. Ein orsøk er, at skipini eru ov stór, ov effektiv og alt ov nógv í mun til at tryggja eina burðardygga veiðu. Í 2007 mettu óheftir granskarar innan fiskivinnu, at heili 29 av teimum 33 týdningarmiklastu stovnunum vóru ovfiskaðir.[24]

Kvotuskipanin hjá ES virkar soleiðis í dag, at fiskimenn meira ella minni fáa ein vinning av at blaka fisk útaftur. Um tað einstaka fiskiskipið fær fong, sum ikki er fevnt av kvotuni hjá skipinum, ella fiskurin er ov smáur til at verða seldur til mannaføði, verður hann grýttur í havið aftur. Bara í Norðsjónum og Kattegat, verður mett, at ein slakur fjórðingur av toskinum, sum bleiv fiskaður í fjør, varð koyrdur aftur í havið. ES metir, at sløk 23 prosent av samlaðu veiðuni verður blakað út aftur.

Hetta ásanna tey flestu, og tí arbeiðir ES við einum nýggjum og dagførdum fiskivinnupolitikki. Skrokkurin í nýggja felags fiskivinnupolitikkinum er bygdur, men nýggju ásetingarnar eru ikki endaliga samtyktar í teimum ymisku stovnunum, so tað sum verður sagt niðanfyri kann broytast.

Ásett er í ES-reglum, at FFP skal endurskoðast 10. hvørt ár. Tilgongdin at endurskoða FFP hesa ferð er tann fyrsta, har ES-Tingið og ES-Ráðið skulu taka avgerðir saman sambært nýggju ásetingunum í Lissabon sáttmálanum. Stórir munir eru framvegis á støðuni hjá Ráðnum og Tinginum til ávís mál í samlaða uppskotinum til endurskoðan av FFP, umframt at ósemjur eru millum limalondini í Ráðnum.

---

***24** Den fælles fiskeripolitik – en brugervejledning s. 5*



Nakrar av týdningarmiklastu broytingunum, sum ES-Tingið hevur samtykt, eru:

- ***Fyri at tryggja burðardyggan fiskiskap tekur ES-Tingið undir við, at innan 2015 skulu heildarkvotur ikki ásetast hægri enn tað, sum gevur mest varandi úrtøku (MSY).***
- ***ES-Tingið tekur undir við einum landingarkravi og útblakingarbanni fyri alla fiskiveiðu. Limalondini skulu fáa trý ár frá 2014 at laga seg til hesi krøvini.***
- ***Fyri at styrkja um regionalar heimildir í fiskivinnuumsiting hevur ES- Tingið samtykt, at limalond kunnu sjálvi áseta egnar langtíðar umsitingarætlanir og samstarva sínámillum um felags stovnar, serliga viðvíkjandi tekniskum reguleringum.***
- ***Kvoturnar verða ásettar til, hvat skipini fiska, og ikki hvat tey landa.***

Tað hevur verið funnist at útblaking í ES í nógv ár. Hesum vil ES koma til lívs. Nýggi fiskivinnupolitikkurin fer at sýta fyri útblaking av fiski frá 2015. Fyrsta bannið verður uppsjóvarfiskur og laksur í Eystursjónum. Sum árini ganga fer bannið at fevna um onnur fiskasløg eisini.

Ætlanin er eisini at minka um sentralu stýringina í Brússel, so tað í størri mun verða einstøku økini, sum fáa størri ávirkan. Eitt nú verður tað møguligt hjá londunum við Eystursjógvin at avgera, um eitt forboð skal setast móti útblaking av fiskasløgum, sum tað í dag ikki eru ásettar kvotur fyri, eitt nú sjósíl. Tað verður kortini í ávísum førum loyvt at blaka upp til 5 prosent av veiðuni útaftur.

Møguliga størsti trupulleikin í FFP er, at tað eru ov nógv, ov stór og ov effektiv skip. Høvuðsamboðið hjá ES at koma hesum til lívs er at seta í verk individuellar umsetiligar kvotur. Privatiseringin av kvotunum skal tryggja, at færri skip skulu vera í flotanum.25

Hesa skipan fingu íslendingar sær í 1990 og Danmark í 2005. Við individuellum umsetiligum kvotum og forboð ímóti útblaking av ov smáum fiski, skeivum fiskaslag ella fiski, har nationala kvotan er brúkt, væntar ES, at hvør einstakur bátur fer einans eftir tí, sum hann kann føra til lands.26

Heilt yvirskipað býta partarnir seg í tvey í hesum spurningi: Tey, sum eru fyri, halda hetta steðgar ovfiskingini og hini, ið bera ótta fyri, at privatiseringin av kvotunum hevur stórar sosialar avleiðingar við sær, tí smáu fiskivinnusamfeløgini og smærri reiðaríini ikki megna at standa seg í kappingini um kvoturnar við størri og sterkari reiðaríir.

---

***25*** *Meira um hesa skipan her: http://www.foi.life.ku.dk/publikationer/foi_serier/~/media/migration%20folder/upload/foi/docs/publikationer/rapporter/nummererede%20rapporter/110-119/119.pdf.ashx*

***26*** *NOTAT – magasin om demokrati og Europa, marts 2012*



Atfinningar móti skipanini við individuellum umsetiligum kvotum byggja millum annað á royndirnar í Íslandi. Í stuttum er ræðusøgan um, at[27]:

- *Kvoturnar fáa ein prís*
- *Prísurin verður umsettur til kapital*
- *Tann privati kapitalurin verður brúktur til alt annað enn tað, sum hevur við fisk at gera.*
- *Royndirnar í Íslandi hava verið, at teir størru og ríku eru blivnir størri og ríkari.*
- *Kapitalurin er savnaður á fáum hondum. Kapitalurin er millum annað brúktur at gera flakavirkir umborð á skipum, og hetta hevur havt við sær at 60% av øllum arbeiði, ið hevur við fiskivinnuna á landi at gera, er burtur.*
- *Teir 10 størstu kvotaeigararnir eiga nú yvir 50% av øllum kvotunum.*

Ein onnur grundleggjandi broyting verður nýggi menningargrunnurin. Virksemið hjá nýggja menningargrunninum verður tætt knýtt at yvirskipaða málinum um at tryggja ES eina burðardygga fiskivinnu. Tað kann tykjast vera ein andsøgn, at menningargrunnurin ikki longur ætlar at stuðla upphøgging fyri at koma afturvendandi trupulleikin við yvirkapasitetinum til lívs. Men hesin stuðul hevur kortini víst seg ikki at virka, og tí er ætlanin at leggja á annan bógv. Grunnurin fer at leggja seg eftir at stuðla yvirgongdini til burðardygga veiðu og lætta um yvirgongdina til fullkomiliga bannið móti at útblaka fisk. Tí fer grunnurin millum annað at lata stuðul til íløgur í útgerð um borð á fiskiskipum fyri at gagnnýta óynskta fiskin betri.[28]

Frá 2014 til 2020 verður EMFF nýggja stuðulsamboðið. Samlaða fíggjarætlanin hjá grunninum verður 6,5 milliardir evrur. Í mun til verandi stuðulsskipan, so eru høvuðsbroytingarnar millum annað hesar[29]:

- *Fíggjarligi stuðulin til upphøgging steðgar. Hesin stuðulsmøguleiki er miseydnaður, tí fyri hvørt skip, sum er sent til upphøggingar, hevur eitt annað skip uppgraderað seg. Endaliga úrslitið hevur verið at kapasiteturin í flotanum bara er vaksin.*
- *Verandi fíggjarligu amboðini verða integrerað í ein einstakan menningargrunn. Hetta vil føra til ein einfaldari tilgongd.*
- *Fígging verður tætt knýtt at yvirskipaðu málunum í nýggja felags fiskivinnupolitikkinum. Halda limalondini ikki ásetingarnar í nýggja politikkinum, fáa tey ongan stuðul úr grunninum.*

---

***27*** *Ibid*

***28*** *http://ec.europa.eu/fisheries/reform/emff/index_en.htm*

***29*** *Ibid*



## 5. Avleiðingarnar fyri Føroyar

Felagsfiskivinnupolitikkurin rúmar nógvar ymiskar tættir. Í hesum partinum havi eg valt nakrar týðandi tættir, sum verða mettir at hava stóra ávirkan á føroyska fiskivinnu, gerast vit limur í ES.

Í fyrstu atløgu er neyðugt at taka nøkur fyrivarni.

### *5.1 Samráðingarstøða Føroyar*

Limaskapur í ES er fyrst og fremst ein samráðingarspurningur. Samráðingarnar eru tengdar at tí einstaka landinum, og úrslitið lagar seg eftir, hvat hvørt einstakt land kann bjóða við samráðingarborðið. Tí hava ymisk lond ymiskar samráðingar. Tað er í verandi støðu ógjørligt at siga, hvørjar ítøkiligu avleiðingarnar høvdu verið á fiskivinnuøkinum fyri Føroyar, um vit gerast limur í ES. Vit fáa einans ítøkilig og neyv svar, tá ið vit fara undir samráðingar, um hvørjar treytirnar høvdu verið og hvørji fyrivarni, vit høvdu megnað at fingið.

Fyri at gera eina haldgóða meting av møguligum avleiðingum, er neyðugt at styðja seg til eitt haldgott grundarlag. Í fyrsta lagi verður hugt at galdandi ES-lóggávu og grundreglum á fiskivinnuøkinum, sum verandi limalond hava samtykt, og sum nýggj lond eru noydd til at taka undir við, tá ið tey gerast limir í ES. Afturat hesum ber til at finna íblástur í teimum serskipanum og tillagingarskipanum, sum nýggj limalond vanliga fáa. Hesir tættir eru hampiliga ítøkiligir og roknast kann við, at framtíðar samráðingar ikki víkja grundleggjandi frá hesum. Íblástrarkeldur av meira óítøkiligum slag eru samráðingartilgongdirnar hjá bæði Noregi í nítiárunum og Íslandi farnu árini. Sum kunnugt endaðu samráðingarnar hjá Noregi og Íslandi ikki við ES-limaskapi.

Noreg og ES komu á mál við samráðingunum, og avtalan væntaði so at siga bert formliga undirritan, men tá avtornaði havnaði norska fólkið uppskotið. Støðan hjá Íslandi er øðrvísi, tí samráðingarnar slitnaðu, áðrenn allir tættir vóru liðugt umrøddir. Millum annað komu íslendingar og ES ongantíð í gongd við ítøkiligu samráðingarnar um fiskivinnuna, og tí skulu fyribils samráðingarúrslitini hjá Íslandi takast við ávísum fyrivarni. Hetta tí at fyribils samráðingarúrslit vanliga eru loynilig, inntil allar samráðingar eru lidnar. Tá samráðingarnar ongantíð komu á mál, er meginparturin av fyribils samráðingarúrslitinum ókendur, og í tann mun ávís úrslit eru kend, umboða hesi í besta føri bert ein part av heildini.

Samráðingarnar við Ísland og Noreg eru kortini góðar sum íblástrarkeldur, men vit eiga at vera varlig at samanbera okkum við okkara grannatjóðir. Hóast Noreg og Ísland vanliga eru lond, vit samanbera okkum við, tá okkara samfeløgini ikki eru ólík, so skerst kortini ikki burtur, at stórur munur er millum Noreg/Ísland og Føroyar bæði landafrøðiliga og vinnuliga. Tað er nevniliga ikki mentanarligur líkskapur, ið er avgerandi í ES-samráðingum, men hinvegin tilfeingi og marknaðarmøguleikar, og á hesum økjum er framvegis stórur munur á Føroyum øðrumegin og Noregi og Íslandi hinumegin.



Ein snávingarsteinur, sum forðar fyri at gera eina neyva meting er, at ES hevur í dag onga avtalu við eitt land, sum er í júst somu støðu sum Føroyar. Tað merkir: Pinkutjóð, atland og við fiskivinnu sum høvuðsvinnu. Við øðrum orðum eru okkara ríkisrættarligu, búskaparligu og samfelagsligu fyritreytir nógv øðrvísi enn tær hjá eitt nú Noregi, Spania ella Portugal, sum eru fiskivinnutjóðir, ið annaðhvørt eru blivnar ES-limir ella hava verið í einari samráðingartilgongd.

Fyritreytirnar hjá eitt nú Noregi og Spania vóru rættiliga ymiskar. Miðskeiðis í áttati-árunum hevði Spania ein risastóran fiskiflota, og ES var ógvuliga avgjørt í sínari tíð at nokta sponskum fiskiførum fría atgongd til ES-sjógv, tí ótti var fyri at stóri fiskiflotin hjá Spania fór at økja munandi um tilfeingistrotið. Portugal og Spania blivu tí hildin uttanfyri FFP, og fingu at kalla eingi veiðurættindini í ES-sjógvi. Undir samráðingunum við portugisar og spaniumenn um limaskap bant ES seg hinvegin til at útvega teimum veiðirættindini aðrastaðni, serliga í Afrika og Suður-Amerika. Støðan hjá Noregi í níti-árunum var júst tann øvugta. Stóra fiskivinnuríkidømi hjá norðmonnum hevði givið væl størri møguleikar hjá ES-flotanum at fiska, uttan at støddin á norska flotanum hótti ES-stovnarnar munandi.

Tað er neyvan ivi um, at samráðingarstøða Føroya á fiskivinnuøkinum óivað fer at treytast av, um Noreg og Ísland framvegis eru uttanfyri ES. Skulu vit geva okkum bestu fyritreytir at fáa nøkur fyrivarni, so er óivað týdningarmikið, at vit ikki koma rennandi aftaná, tá ella um Ísland og Noreg gerast limir í ES. Okkara grannatjóðir eru so mikið sterkar tjóðir á fiskivinnuøkinum, at eydnast ES at innlima bæði londini, so er ógvuliga smátt við samráðingartyngdini hjá Føroyum á fiskivinnuøkinum.

*Kvotubýti og relativur stabilitetur*

Um Føroyar gerast partur av ES, hevur hetta við sær, at føroyaleiðin gerst ES-sjógvur, og avgerðarrætturin í stýringini av fiskiskapinum í prinsippinum kemur at liggja hjá ES. ES fær myndugleika at áseta MLV og onnur stovnsverndartiltøk. Sum partur av ES varðveita vit tó rættin at regulera lokalar fiskastovnar innanfyri 12 fjórðingar og gera sjálvi av, hvussu vit býta tillutaðar heildarkvotur.

Mannagongdin verður, at ES-Ráðið hvørt ár ásetir MLV fyri teir fiskastovnar í ES-sjógvi, sum hava vinnuligan týdning. MLV verður ásett eftir uppskoti frá ES-Kommissiónini. Grundarlagið fyri MLV eru tilmæli frá ICES. MLV verður ásett fyri hvønn einstakan fiskastovn. ES-heildarkvotan verður síðani býtt millum limalondini eftir býtislyklinum frá 1983. Limalondini avgera sjálvi, hvussu tillutaðar heildarkvotur verða býttar innlendis.



Føroyar hava í dag eina fiskidagaskipan, meðan ES hevur eina kvotaskipan. Tað er nógv, sum talar fyri, at Føroyar høvdu kunnað varðveitt fiskidagaskipanina, hóast onnur limalond eru skipað eftir einari kvotaskipan, tí limalond hava ræðið á hesum øki sambært FFP. Fiskidagaskipanin leggur ikki á sama hátt upp fyri, hvussu nógv tons verða fiskað, men heldur savnar seg um, hvussu stór veiðuorka verður nýtt til at fiska tilfeingið. Flest øll ES-lond brúka eina kvotaskipan, men tað eru eisini dømi um blandingsskipanir. Eitt nú brúka skotar bæði kvota- og fiskidagaskipan[30], so møguleikin fyri einari fiskidagaskipan eigur at vera til staðar.

Á hvørjum ári kemur ein tilráðing frá ICES um, hvussu nógv eigur at verða fiskað undir Føroyum, men tað er eingin treyt, at føroyingar fylgja tilráðingini. Gerast vit limir í ES, skal tilráðingin frá ICES fylgjast í nógv størri mun enn undir verandi skipan. Við øðrum orðum verður formliga kravið um at fylgja havfrøðiligu tilráðingini hert við føroyskum ES-limaskapi.

ES hyggur í fyrstu atløgu at søguligu veiðuni, tá ið veiðurættindini verða tillutað. Í aðru atløgu, hvønn týdning fiskivinnan hevur fyri lond og landspartar, og í triðja atløgu hvat komandi ES-limalandið hevur mist av veiðurættindum vegna fiskimarks-útflytingar hjá triðjalondum. Einstakir ES-sefrøðingar halda at hetta seinasta ongan týdning hevur longur, og varð bert brúkt sum lykil í fyrsta kvotubýtinum í 1983. Dømi um hetta er spanski limaskapurin í 1986, har ES afturvísti kravið hjá Spania um, at Spania skuldi hava býtið eftir, áðrenn 200 fjórðingar markið varð flutt út í sjeytiárunum.[31]

**30** *http://www.scotland.gov.uk/Topics/marine/Sea-Fisheries/17681*

**31** *Bretska working paper*



Um Føroyar gerast partur av FFP, bendir nógv á, at veiðurættindi hjá øðrum ES-skipum í føroyskum sjógvi, verða grundað á søgulig rættindi, eitt nú fiskiskapin tey síðstu 5-10 árini, saman við serstøðu okkara sum fiskivinnutjóð.[32] Fer ES undir samráðingar við Føroyar, verður tað fyrstu ferð, at ES samráðist við eitt land, sum er so bundið at fiskivinnu. Júst grundgevingina fyri, hvussu bundin tú ert av fiskivinnu, var ein høvuðsgrundgeving hjá Íslandi, tá ið landið fór undir samráðingar um ES-limaskap. Noreg vildi somuleiðis hava fleiri fyrivarni undir samráðingum í nítiárunum, tí norðmenn vístu á, at fiskivinnan hevði størri týdning fyri Noreg enn hini tólv londini bæði búskaparliga og bygnaðarliga. Ísland er seinasta fiskivinnutjóð , sum hevur verið í einari tilgongd at tryggja sær ES-limaskap. Íslendingar gjørdu greitt, tá ið landið lat sína umsókn inn, at tað var ein treyt, at Ísland fekk eina seravtalu, sum tryggjaðu fult ræði á egnum fiskastovnum.[33] Millum grundgevingarnar hjá Íslandi vóru[34]:

- *Ísland er meira heft at fiskivinnu enn nakað annað ES-land.*
- *Ísland fiskar einsamalt 25% av tí, sum ES fiskar tilsamans.*
- *Nærum helvtin av íslendska útflutninginum stavar frá fiskivinnuni.*
- *Inntøkan av fiskivinnuni fyri hvønn íbúgva er 100 fer so stór í Íslandi sum í ES.*
- *Íslendska havøkið er stórt - 760.000 ferkilometrar - og hevur ikki mark til onnur ES-lond.*
- *Fiskivinnupolitikkurin í ES hevur verið alt annað enn væleydnaður, meðan tað hevur eydnast Íslandi at rationalisera vinnuna og tryggja burðardygga veiðu (Ísland fiskar 1,4 mió. tons við 500 skipum, meðan Spania fiskar 700.000 tons við 11.000 skipum).*
- *Fleiri ES-lond og øki í ES* ***hava*** *longu serskipanir sum er - t.d. Malta og Kanarisku oyggjarnar.*
- *ES endurskoðar í løtuni sín egna fiskivinnupolitikk. Tað fer væntandi at hava við sær, at londini sjálvi sleppa at umsita ávísar lokalar fiskastovnar*

Íslendska samráðingartilgongdin er fyribils endað. Tað er tí ógjørligt at meta um, hvørt íslendingar høvdu fingið nøkur grundleggjandi fyrivarni. Í bóklinginum “Ja til Evropa” varð spátt, at tað var sannlíkt, at Ísland sum ES-limur kann varðveita ræði á sínum egnu, lokalu bornfiskastovnum. Kortini var meira ivasamt við pelagisku fiskasløgnum, tí her fór ES væntandi at krevja eina fasta avtalu, sum tryggjar stabilitet yvir tíð.

Hyggja vit eftir teirra uppskotið, so eru fleiri viðurskifti, sum minna nógv um tey føroysku, skuldu vit komið so langt sum at samráðast. Hyggja vit nærri at føroysku fiskivinnuni, so fiskaðu føroysk skip í 2012 samanlagt 360 túsund tons á øllum havleiðum, av hesum vórðu smá 45% fiskað á føroyskum øki. Hetta er nakað meira enn tað, sum fiskað varð fyrst í 1990’unum. Størsti parturin av tí, sum fiskað varð, áleið 231 túsund tons, er tað vit kalla uppsjóvarfiskur. Um 90 túsund tons vóru botnfiskasløg. Besta fiskiárið var 2006, tá fiskað vóru 623 túsund tons, av hesum var 436 túsund tons uppsjóvarfiskur. Tað var serliga fiskiskapurin eftir svartkjafti, sum er minkaður nógv seinastu 4 árini.

---

***32*** *Et market for Fisk? Om EFs fiskeripolitikk og norsk fiskerinæring, s. 34*

***33*** *Sí alt uppleggið hjá Ísland: http://www.mfa.is/media/esb/27072010-Iceland-statement.pdf*

***34*** *Ja til Evropa s. 75*



Fiskur er okkara mest týðandi útflutningsvøra. Av vøruútflutninginum hava fiskavørur seinastu árini talt um 90-95% av øllum útflutninginum. Útflutningurin av fiskavørum í 2012 var góðar 5 milliadir krónur. Sjálvt tá tænastuútflutningurin verður taldur uppí, telir fiskaútflutningurin nógv størsta partin – í 2011 taldi fiskaútflutningurin um 70% av øllum útflutningi av bæði vørum og tænastum samanlagt. Av virðisøkingini í landinum taldi fiskiskapur um 11% í 2011. Niðanfyri eru lyklatøl frá Hagstovuni:

| **Lyklatøl 2012** | |
|---|---|
| Heildarveiðan, tons | **360 473** |
| - herav uppisjóvarfiskur, tons | **231 146** |
| Virðisøking (2011), mió. kr. | **1 381** |
| Løntakarar | **1 585** |
| Avreiðingarvirði, mió kr. | **782** |
| Avreiðingarnøgd, tons | **82 810** |

*Dagført: september 2013*

Meginreglan um relativan stabilitet í veiðurætindum í ES ger, at tað veiðumynstur, sum ES-londini hava havt við Føroyar, verður varðveitt í einum møguligum komandi føroyskum ES-limaskapi. Henda meting byggir á, hvørji veiðurættindi ES-fiskifør fingu í sponskum og portugisiskum sjógvi. Tey fingu tað, sum í høvuðsheitum svaraði til tað, tey høvdu fiskað har undanfarnu árini.

Veiðurættindi hjá ES í føroyskum sjógvi verða tí væntandi helst á leið tey somu, sum hava verið ásett í fiskiveiðuavtalunum tey seinnu árini.[35] Tá ið Føroyar og ES orsakað av silda- og makrelstríðnum, ikki hava havt nakra fiskivinnuavtalu síðan 2010, verður neyðugt at hyggja eftir árunum áðrenn tað. Í hagtølunum hjá Fiskiveiðureftirlitinum sæst, hvussu nógv og hvørji fiskasløg ES-lond hava fiskað undir Føroyum millum 2008 og 2010. Brúka vit hesi hagtøl, síggja vit, at fiskifør hjá ES hava serliga fiskað svartkjaft, blálongu og upsa.

***35*** *EF og Færoyene s. 106*



*Veiðan hjá útlendskum fiskiførum undir Føroyum, tons ósløgd, skift á ár, fiskasløg og fiskidagar og lond*

| 2008 | ES-lond, tilsamans |
|---|---|
| Toskur | 439,3 |
| Hýsa | 70,6 |
| Upsi | 408,2 |
| Longa | 46,2 |
| Blálonga | 859,9 |
| Brosma | 29,1 |
| Kongafiskur | 123,9 |
| Kalvi | 15,6 |
| Svartkalvi | 5,7 |
| Havtaska | 59,6 |
| Svartkjaftur | 3 489,3 |
| Sild | - |
| Makrelur | - |
| Gulllaksur | 1,9 |
| Langasporl | 409,7 |
| Stinglaksur | 40,4 |
| Flatfiskur | 11,5 |
| Hávur | 136,7 |
| Annað | 180,5 |
| **Tilsamans** | **6 328,1** |
| **Fiskidagar** | **671,0** |

| 2010 | ES-lond, tilsamans |
|---|---|
| Toskur | 351,3 |
| Hýsa | 71,6 |
| Upsi | 668,7 |
| Longa | 253,0 |
| Blálonga | 908,6 |
| Brosma | 57,8 |
| Kongafiskur | 171,1 |
| Kalvi | 11,1 |
| Svartkalvi | 189,1 |
| Havtaska | 34,9 |
| Svartkjaftur | 1 310,0 |
| Sild | - |
| Makrelur | - |
| Gulllaksur | 2,4 |
| Langasporl | 538,1 |
| Stinglaksur | 172,9 |
| Flatfiskur | 40,8 |
| Hávur | 119,1 |
| Annað | 388,0 |
| **Tilsamans** | **5 288,4** |
| **Fiskidagar** | **805,0** |

| 2009 | ES-lond, tilsamans |
|---|---|
| Toskur | 333,1 |
| Hýsa | 83,9 |
| Upsi | 623,6 |
| Longa | 237,5 |
| Blálonga | 811,5 |
| Brosma | 34,6 |
| Kongafiskur | 150,0 |
| Kalvi | 19,1 |
| Svartkalvi | 3,7 |
| Havtaska | 88,8 |
| Svartkjaftur | 121,7 |
| Sild | - |
| Makrelur | - |
| Gulllaksur | 2,1 |
| Langasporl | 428,1 |
| Stinglaksur | 144,7 |
| Flatfiskur | 15,2 |
| Hávur | 77,4 |
| Annað | 347,3 |
| **Tilsamans** | **3 522,2** |
| **Fiskidagar** | **773,0** |



Í nítiárunum minkaði veiðan hjá ES-londum í føroyskum sjógvi munandi. Harafturat hevur tað víst seg, at tær kvotur, ES hevur fingið í føroyskum sjógvi, ikki verða uppfiskaðar. Stórar bygnaðarbroytingar eru farnar fram í fiskiflotanum hjá ES. Fjarfiskiflotin í Bretlandi, Týsklandi og Fraklandi minkaði rættiliga skjótt, tá fiskimørkini vórðu flutt út, og londini hava fingið ein flota, sum er lagaður til fiskiskap á heimaleiðum. Afturat hesum kemur, at toska- og hýsustovnarnir undir Føroyum, sum í sínari tíð høvdu týdning fyri serliga bretskar fiskimenn, hava verið illa fyri seinastu árini. Niðanfyri eru hagtølini fyri 2010, og her síggja vit, at bara ein triðingur av heildarkvotuni varð fiskaður.

## EU

| | Kvota | Veiða | Status |
|---|---|---|---|
| **Cod, Haddock** | 500.000 | 422.951 | 77.049 |
| **Saithe** | 2.425.000 | 668.742 | 1.756.258 |
| **Redfish** | 1.600.000 | 171.067 | 1.428.933 |
| **Blue ling,ling** | 2.700.000 | 1.872.570 | 827.430 |
| **Flatfish** | 300.000 | 248.836 | 51.164 |
| **Blue Whiting** | 2.700.000 | 1.310.000 | 1.390.000 |
| **Mackerel** | 3.765.000 | 0 | 3.765.000 |
| **Other Species** | 760.000 | 424.061 | 335.939 |
| **Others** | 0 | 170.172 | -170.172 |
| **Tils.** | **14.750.000** | **5.288.399** | **9.461.601** |

Í norsku limaskapssamráðingunum í nítiárunum vóru partarnir samdir um, at treytirnar hjá ES-førum fyri at sleppa í norskan sjógv skuldu vera á leið tær somu sum frammanundan. Tað landið í ES, sum troðkar mest á at fáa veiðurættindi aðrastaðni – Spania – hevur eingi søgulig rættindi við Føroyar. Í einari samráðingarstøðu, har vit verða noydd at lata veiðurættindi, kann hetta vera eitt gott kort at hava á hondini.[36]

Um Føroyar gerast partur av ES, verður høvuðsreglan, at ES-fiskifør kunnu fiska sínar kvotur allastaðni í føroyskum øki ella ið hvussu so er á tí ICES øki, kvotan er knýtt at. Sambært galdandi reglum í ES hava limalondini rætt til at hava 12 fj. fiskimark. Innanfyri hetta mark kunnu vit sjálvi áseta reglur fyri fiskiskapin, sum kortini skulu vera innanfyri karmarnar av FFP. Henda áseting stavar frá fyrst í sjeytiárunum, tá ið Írland, Bretland og Danmark kravdu at fáa hetta fyrivarni við, tí ótti var fyri, at útlendsk skip fóru at oyða útróðurin í teimum trimum fiskivinnutjóðunum, sama um tað var ímóti aquis commentaire.[37]

*36 Bláa álitið s. 101*

*37 The Evolution of the Common Fisheries Policy, working paper*



Fiskifør úr øðrum limalondum sleppa bert at fiska, um tey hava søgulig rættindi innanfyri 12 fj., men hetta er ikki galdandi í føroyskum sjógvi í nýggjari tíð. Í Føroyum eru tað fyrst og fremst útróðrarbátar, sum royna innanfyri 12 fj. markið. Henda meginregla um, at limalondini sjálvi áseta reglur fyri fiskiskapin innan 12 fj. er upprunaliga ætlað londum ella landspørtum, sum eru serliga bundin av fiskivinnu. Vert er í hesum sambandi at leggja til merkis, at Malta fekk eitt fyrivarni á júst hesum øki, tá ið landið gjørdist ES-limur í 2004. Malta slapp at áseta egnar reglur út á heili 25 fj., sum er nakað longri enn siðvenjan áðrenn hevði verið. Fyridømi við Malta skuldi latið upp fyri møguleikanum, at vit í einum komandi ES-limaskapi sluppu tað sama. Tað er kortini vert at hava í huga, at fiskivinnan á Malta er ikki nakar bulur í maltesiska búskapinum, bara 3% av BTÚ, so fiskivinnan á Malta ávirkar ikki stórvegis aðrar fiskivinnutjóðir í ES. Av somu orsøk var tað rímuliga ómakaleyst at geva Malta hetta fyrivarni, tí tað skeikladi ikki stórvegis samlaðu fiskivinnuna hjá ES.

Á sama hátt sum onnur fiskifør fáa fiskirættindi undir Føroyum, fáa føroysk fiskifør møguleika at fiska á leiðunum hjá øðrum ES-londum. Hetta merkir sambært relativum stabiliteti, at gerast vit partur av ES, fara veiðumøguleikarnir okkara í ES-sjógvi, íroknað Grønland, helst at vera teir somu sum tey seinnu árini. Tá Spania gjørdist limur í ES, varð teirra partur av heildarkvotunum í ES ásettur við støði í søguligum veiðutølum. Úrslitið av norsku limaskapssamráðingunum fyrst í nítiárunum var, at partarnir vóru samdir um, at tað veiðumynstrið, sum hevði ment seg innanfyri karmarnar av sínámillum fiskiveiðusáttmálum, í høvuðsheitum eisini skuldi halda fram. Aftur her er vert at legga afturat, at vit ikki hava havt eina fiskiveiðuavtalu við ES síðan 2010, og tískil má veiðumynstrið, frá undanfarnum árum brúkast. Føroya hava í størri mun megnað at gagnnýtt sínar kvotur í ES sjógvi. Hagtølini fyri 2010 eru niðanfyri.

**EU**

| | Kvota |
|---|---:|
| **Ling and Tusk** | 200.000 |
| **Blue Ling** | 150.000 |
| **Herring** | 660.000 |
| **Horse Mackerel** | 2.000.000 |
| **Sprat** | 9.160.000 |
| **Blue Whiting** | 9.000.000 |
| **Mackerel** | 4.536.000 |
| **Sandeel** | 2.500.000 |
| **Herring** | 450.000 |
| **Other whitefish** | 150.000 |
| **Tils.** | **28.806.000** |



*Útlendingar í føroyskari fiskivinnu*

ES-hugsjónin byggir á eina grundleggjandi fatan av felagsskapi. Tað eru støður, har ES eru 28 ymisk lond , og tað eru aðrar støður, har ES er at hugsa sum eitt savnað samveldi. FFP og innari marknaðurin hoyra í seinna bólkin, har ES er ein savnað eind – ein felagsskapur, har ikki verður skilt millum lond. Avleiðingin av hesum er, at tað ikki longur skal skiljast millum føroyingar og útlendingar, men heldur millum ES-borgarar og triðjalandsborgarar.

Føroysk lóggáva hevur í mong ár forðað fyri, at útlendingar kunnu eiga meir enn ein ávísan part av føroysku fiskiførunum. Í lógini um vinnuligan fiskiskap stendur um ræðisrættin, at eigararnir skulu vera skrásettir at búgva í Føroyum, og vera fult skattskyldugir í Føroyum.[38] Eisini skulu føroyingar í minsta lagi eiga 2/3 av eginpeninginum í felagnum, umframt at føroyingar skulu hava minst 2/3 av atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum.[39]

Endamálið við hesum ásetingum er at tryggja, at føroyingar hava ræðisrætt yvir skipum, sum fiska við føroyskum fiskiloyvi. Hóast lógin um vinnuligan fiskiskap avmarkar útlendskan ognarskap og útlendskan kapital við ásetingum, ið skulu tryggja føroyskt ræði á skipum og fiskirættindum, so er tað nógv sum bendir á, at hetta ræðið fyri ein stóran part longu er á útlendskum hondum. Umvegis føroyskar strámenn eru tað útlendsk feløg og útlendskir einstaklingar, sum taka tær stóru avgerðirnar í nógvum á pappírinum føroyskum reiðaríum, og sum til eina og hvørja tíð kunnu drena kapital úr hesum somu reiðaríum.

Um vit gerast partur av ES er greitt, at tað verður torført at varðveita slíkar formligar reglur um útlendskan eigaraskap, sum vit kenna til í dag. Hetta kemst av, at tær eru ikki í samsvari við galdandi meginreglur hjá ES um, at mannamunur ikki skal gerast á ES-borgarum. Hetta er kjarnin í úrskurðinum hjá ES-dómstólinum í málinum um kvotuhoppan seinast í áttatiárunum.[40] ES-dómstólurin segði í hesum høpinum, at lima-lond tó kunnu áseta krøv um veruligt fíggjarligt tilknýti (real economic link) millum skipið og landið, men at hesar ásetingarnar ikki kunnu vera krav um ávísan tjóðskap.

Henda áseting hevur so sterka siðvenju í ES-lóggávu, at tað neyvan kemur upp á tal at sleppa undan við einum varandi fyrivarni. Tað er tó neyvan ómøguligt at fáa eina tillagingarskipan í einari skiftistíð á hesum øki. Júst spurningurin um eigaraskap hevur verið ein tann størsta forðingin bæði í Noregi og í Íslandi, tá ið samráðingar hava verið um ES-limaskap. Bæði Noreg og Ísland hava lóggávu, sum forðar útlendingum at eiga ov stóran part av fiskivinnuni í londunum. Júst hesin spurningurin er eitt kjarnu-áhugamál hjá reiðarunum í báðum londunum, tá ið ES-limaskapur verður umrøddur. Tey bera ótta fyri, at útlendingar seta á fiskivinnuna í báðum londum. Hetta er ein andsøgn serliga í Íslandi, har nógvir íslendingar eru rættiliga virknir í fiskivinnuni í Evropa.

---

***38*** *Løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, sum seinast broytt vil løgtingslóg nr. 109 frá 16. august 2013, § 7, stk. 2*

***39*** *Ibid, stk. 3, nr. 2*

***40*** *Dómur C-221/89 Factortame II*



Norsku royndirnar vísa samanumtikið, at um ætlanin er at fara uppí ES, er torført at fáa undantøk frá fiskivinnupolitisku meginreglunum. Norðmenn fingu undantøk, men hesi undantøk skuldu bert galda í mesta lagi í trý ár. Hyggja vit nærri at upptøkusáttmálanum hjá Noregi í 90 árunum, so sæst, at ES kundi góðtaka eina tillagingarskipan.

Sambært grein 35 í norska upptøkusáttmálanum kundi Noreg í eitt trý-ára skeið varðveita reglurnar um, at bert norskir ríkisborgarar kunnu keypa fiskifør. Í felags yvirlýsing í upptøkusáttmálanum verður staðfest, at eitt av endamálunum við kvotubýtisskipanini í ES er at røkja serliga tørvin hjá teimum landspørtum, sum eru serliga bundnir at fiskivinnu og tí virksemi, ið har stendst. Sama grundgeving kundi verið nýtt í møguligum samráðingum millum Føroyar og ES um limaskap. Kortini er týdningarmikið at halda sær fyri eyga, at tað er als ikki vist, at ES í dag hevði givið Føroyum eins lagaligar treytir, sum Noreg fekk fyrst í nítiárunum. Til tess er Noreg nógvar ferðir meira áhugavert at fáa sum limaland enn Føroyar. Harumframt hevði ein slík avtala helst bert verið loyvd í eitt skiftisskeið, soleiðis at allir ES-borgarar aftan á eina tíð høvdu skulað fingið fría atgongd til marknaðin. Í hesum sambandi er vert at leggja afturat, at Malta, ið fekk onnur fyrivarni á fiskivinnuøkinum, ikki gjørdi nakra roynd at halda útlendingar burtur frá maltesiskari fiskivinnu.[41]

Verða dyrnar latnar upp fyri útlendingum, verður óivað ein avleiðing, at virðið av kvotunum økist munandi. Hetta merkir so, at tey reiðarí, sum í dag eiga kvoturnar undir Føroyum, gerast enn meira áhugaverd hjá útlendingum at seta pening í. Nógv ES-lond stuðlað sínum reiðaríum, og tá fáa tey ein kappingarfyrimun mótvegis teimum føroysku reiðaríunum. Ein vandi er eyðvitað, at føroyingar missa ræðisrættin yvir sínum fiskiríkidømi. Í Føroyum er støðugt kjak um útlendingar skulu eiga nakran part í føroysku fiskivinnuni. Kortini eru fá í iva um, at útlendingar í rættiliga stóran mun longu eru partur av føroysku fiskivinnuni gjøgnum sonevndar føroyskar strámenn. Ein ES-limaskapur hevði í størri mun tryggja gjøgnumskygni, og vit kundu komið loyniliga strámannavirkseminum til lívs.

ES-limaskapur fer eisini at ávirka lóggávuna, hvat landingum uttanlands viðvíkur. ES-londini hava javnbjóðis atgongd til havnirnar hjá hvørjum øðrum. Endamálið við hesi áseting er at tryggja fiskiførum úr sáttmálalondunum javnbjóðis atgongd og landingarstøð hjá hvørjum øðrum. Eitt land kann ikki skerja atgongdina til havnir við støði í tjóðskapi.

Tað hevur í nógv ár í Føroyum verið eitt 25% hámark fyri eitt triðingsár í senn fyri hvussu nógv tað ber til at landa uttanlands.[42] Forðingin fyri at gera mannamun er galdandi fyri alla ES-lóggávuna, soleiðis at tað heldur ikki er gjørligt at lóggeva um at gera mismun á landingarstøðum. Tað er ikki nóg góð grundgeving, at landing í Føroyum tryggjar arbeiðspláss í Føroyum. Hetta tí at Føroyar sum ES-limur verður ein partur av felagsmarknaðinum, og tað er júst felagsmarknaðurin og ikki lokali marknaðurin, sum atlit verða tikin til í ES-høpi. Sostatt fellur henda áseting burtur, og møguleikin at áleggja egnum fiskiførum at avreiða heima verður skerdur.

---

***41*** *Iceland, Norway and the EC Common Fisheries Policy, s. 34*

***42*** *Løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, sum seinast broytt vil løgtingslóg nr. 109 frá 16. august 2013, § 9, stk. 4*



### *Missa fiskiveiðuavtalur*

FFP inniber, at ES hevur ekslusivan myndugleika at samráðast og at gera fiskiveiðusáttmálar við lond, sum eru uttanfyri ES. Um Føroyar gerast partur av ES, merkir hetta í høvuðsheitum, at fyri tær fiskiveiðuavtalur, sum Føroyar í dag eru partur av, verður tað ES og ikki Føroyar/Danmark , sum kemur at standa fyri samráðingunum. Tær avtalur, vit hava í dag, verða yvirtiknar av ES, annaðhvørt beinanvegin ella tá tær fara úr gildi, og ES í framtíðini kemur at samráðast okkara vegna. Hetta merkir ítøkiliga, at okkara sjálvstøðugu fiskivinnusáttmálar við Grønland, Russland, Noreg og Ísland umframt við øll strandalondini um norðhavssild, makrel og svartkjaft og okkara avtalur um fiskiskap í altjóða sjógvi, eitt nú Flemish Cap og Svalbard, detta burtur, og ES gerst samráðingarpartur okkara vegna. Allar hesar avtalur mugu samráðast av nýggjum, og tá er tað ES, ið situr við samráðingarborðið. Í sama viðfangi skulu fleiri kjarnuuppgávur, sum Fiskimálaráðið og í ávísan mun uttanríkistænastan á Løgmansskrivstovuni røkja í dag, flytast til Brússel.

Jens Helgi Toftum vísir í sínari serritgerð, sum er skrivað í 1990, at tað er mest sannlíkt, at okkara kvotur á fjarfiskileiðum høvdu minkað, um Føroyar vóru limir í ES. Hetta byggir hann á, at ES ikki hevur fiskiveiðusáttmála við Russland, og tí høvdu møguleikarnir í russiskum sjógvi óivað fallið burtur. Spurningurin er, um í hvønn mun Føroyar høvdu verið kompenseraðar fyri missin í russiskum sjógvi í einari møguligari samráðingartilgongd.[43]

Í sambandi við rættin at samráðast við triðjalond kann nevnast, at eitt av úrslitunum av limaskapssamráðingunum hjá norðmonnum var, at Noreg bert slapp at varðveita rættin at samráðast við Russland um havleiðirnar norðanfyri 62 stig fram til 1998. Eftir hetta skuldi ES heilt yvirtaka samráðingarnar. Við øðrum orðum fekk Noreg eisini á hesum øki eina tillagingarskipan, sum síðani rann út. Allar hinar fiskiveiðuavtalurnar skuldu fella burtur alt fyri eitt, tá ið Noreg eftir ætlan skuldi gerast limaland.[44]

Um Føroyar gerast partur av ES, er hugsandi, at fiskiveiðusáttmálarnir, vit hava við onnur lond, verða ein av teimum truplu samráðingarspurningunum. Hetta er kanska serliga galdandi fyri Barentshavið. Sum partur av ES koma vit at kappast við onnur ES-lond um veiðumøguleikar, eitt nú tey iberisku londini. Somuleiðis er hugsandi, at um vit gerast partur av ES, kunnu trupulleikar stinga seg upp við Íslandssáttmálanum. Hetta hevur m.a. samband við, at ein týðandi partur av íslendskum fiskivinnupolitikki eftir toskakríggini og fiskimarksútflytingarnar í sjeytiárunum hevur verið, at ES-fiskifør ikki skulu hava rættindi í íslendskum sjógvi. Hetta kann merkja, at vit fáa trupulleikar at sleppa at fiska innanfyri íslendskt sjómark, um vit gerast ES-limur.

---

***43*** *EF og Færøyene s. 106*

***44*** *Bláa álitið s. 97*



Við ES-limaskapi fáa vit eisini atgongd til at fiska í øðrum sjógvi, og onnur fiskasløg enn vit gera í dag. ES hevur í dag 24 bilateralar fiskiveiðusáttmálar. Tað er ES, sum umboðar øll limalond í bilateralum samráðingum. Niðanfyri er ein mynd av hvørjr sáttmálar ES hevur bilateralt:

**List of fisheries agreements**

| Country | Expiry date | Type | EC contribution per year | Earmarked for fisheries policy development |
|---|---|---|---|---|
| Cape Verde | 31.8.2014 | Tuna | 435 000 € | 110 000 € |
| Comoros | 31.12.2013 | Tuna | 615 250 € | 300 000 € |
| Côte d'Ivoire | 30.6.2013 | Tuna | 595 000 € | 100 % |
| Gabon | *No protocol in force* | | | |
| Gambia | *No protocol in force* | | | |
| Greenland | 31.12.2015 | Mixed | 15 104 203 € | 2 743 041 € |
| Guinea | *Agreement and Protocol provisionally applied during 2009 but subsequently withdrawn.* | | | |
| Guinea-Bissau | *No protocol in force* | | | |
| Equatorial Guinea | *No protocol in force* | | | |
| Kiribati | 15.9.2015 | Tuna | 1 325 000 € | 350 000 € |
| Madagascar | 31.12.2014 | Tuna | 1 525 000 € | 550 000 € |
| Mauritania | *No protocol in force* | | | |
| Mauritius | *No protocol in force since 3.12.2007* | | | |
| Micronesia | *No protocol in force since 25.2.2010* | | | |
| Morocco | *No protocol in force* | | | |
| Mozambique | 31.01.2015 | Tuna | 980 000 € | 460 000 € |
| São Tomé and Principe | 12.5.2014 | Tuna | 682 500 € | 227 500 € |
| Senegal | *No protocol in force since 1.7.2006* | | | |
| Seychelles | 17.1.2014 | Tuna | 5 600 000 € (as from 17.1.2011) | 40% (as from 17.1.2011) |
| Solomon Islands | *No protocol in force since 8.10.2012* | | | |

**Northern agreements**

| Country | Period |
|---|---|
| Faeroe Islands | 2006 - 2012 |
| Iceland | 2009 - 2015 |
| Norway | 2009 - 2015 |



Sum sæst á myndini omanfyri, er í stóran talan um avtalur við afrikansk lond, har tað fyrst og fremst verður roynt eftir tunfiski.

Ein onnur avleiðing av eksklusiva rættinum hjá ES í fiskivinnumálum er, at ES kemur at umboða okkum í øllum millumtjóða fiskiveiðufelagsskapum. Tað eru í dag yvir 20 ymiskir millumtjóða fiskiveiðufelagsskapir, sum eru at finna kring allan knøttin. Fyri Føroyar hevði hetta merkt, at vit mistu okkara sjálvstøðuga limaskap í NAFO, NEAFC og NASCO. Tann grundleggjandi spurningurin er, í hvønn mun Føroyar høvdu kunnað varðveitt somu svartkjafta-, makrel- og sildakvotu, um vit gjørdust partur av ES. Hesin spurningur er ógvuliga torførur at svara ítøkiliga, tí talan er um ferðandi stovnar, so tað valdast møguliga um, hvussu stór ella lítil føroyska kvotan er, tá ella um vit gerast limur í ES. Ein varlig meting er, at samlaðu kvoturnar hjá Føroyum gjørdust partur av ES-kvotuni, og at Føroyar fingu minni í sín lut, tí kappingin um ES-kvotuna hevði verið stór. Hetta sjónarmið er bygt á eina leysliga meting.

*Serskipanir*

Føroyar hava fleiri serskipanir fyri fiskivinnuna, ið møguliga mugu avtakast ella í ávísan mun broytast, um Føroyar gerst limur í ES. Fiskimannafrádrátturin, avgjaldsfrítøka á brenniolju og sonevnda fiskavirkisskipanin eru tríggjar serskipanir, ið til ber at taka fram.

Yvirskipaðu reglurnar um almennan stuðul hava til endamáls at tryggja somu kappingartreytir fyri alt ES-økið. Limalondini kunnu ikki veita egnum vinnulívi serligar kappingarsømdir við almennum stuðli, sum avlaga kappingina.

Persónsskattalóggáva er ikki eitt ES-felagsmál, og tí hava einstøku ES-londini frælsi á skattaøkinum. Har sum møguligir trupulleikar kunnu stinga seg upp, er tá landsmál ávirka felagsmál. Aftur her skal havast í huga, at tað er felagsmarknaðurin, ið liggur ES fremst í sinni. Um føroysk arbeiðsmegi hevur skattafyrimunir, sum avlaga kappingina á felagsmarknaðinum, kann ES forða fyri slíkum fyrimunum, hóast at persónskattamál ikki eru felagsmál.

Fiskimannafrádrátturin kann lesast sum kappingaravlagandi í tann mun, at tað møguliga loysir seg betri hjá feløgum at virka í Føroyum og seta fiskimenn búsitandi í Føroyum, tí hesir hava eitt lægri brutto-lønarlag. Slíkir skattafyrimunir kunnu avlaga kappingina á felagsmarknaðinum. Tá skattaøkið ikki er eitt felagsmál, er tað sostatt ikki skattafyrimunir í sjálvum sær, sum ganga ES ímóti. Tað er heldur tann møguliga avleiðingin slíkir fyrimunir hava fyri felagsmarknaðin.

Men í persónsskattamálum vendir landið sær beinleiðis til borgaran, og tí er talan ikki um statsstuðul til fyritøkur, ið vanliga eru bannaðar í ES-høpi. Tað er óvist, og rættiliga ósannlíkt, at hugtakið statsstuðul kann víðkast til eisini at fevna um ein persónsfrádrátt. Tó kann ein møgulig kappingaravlagandi avleiðing framvegis vera ólóglig í ES-høpi – tó ikki við statsstuðli sum grundgeving. Tað er tó ikki óvanligt, at limalond hava serskattaskipanir, og tí er ikki óhugsandi, at tað ber til at skipa seg eftir einum leisti, har tað ber til at varðveita fiskimannafrádráttin so ella so.



Statsstuðul kann hinvegin koma upp á tal, tá talan er um meira beinleiðis stuðul til vinnuna, t.d. avgjaldsfrítøka á brennioljugjaldi. Her vendir landið sær beinleiðis til fyritøkuna, og tí er talan um ein meira klassiskan landsstuðulsstøðu. Hóast avgjalds-frítøka í síni heild verður sædd sum landsstuðul, so eru ymisk undantøk. Hesi undan-tøk eru m.a. skipað í sonevndum minimums-direktivum, har ES ásetir eitt minstamark fyri avgjald.[45] Limalondini kunnu so sjálvi avgera, hvussu nógv hægri enn minsta-markið avgjøldini skulu vera. Hetta gevur limalondum eitt ávíst rásarúm at laga avgjøldini til, men talan er ikki um fullkomiligt frælsi.

Óvist er, um sonevnda fiskavirkisskipanin kann sigast at vera statsstuðul. Í stuttum ber skipanin við sær, at serligar sosialar veitingar verða veittar starvsfólki á flaka-virkjum, teir dagarnar eingin fiskur er á virkjunum. Sosialar veitingar eru, eins og persónsskattamál, ikki eitt ES-felagsmál. Tað stendur sostatt limalandinum frítt at áseta sosialar veitingar til borgaran. Men aftur her sum við fiskimannafrádráttinum, er tað ikki tann sosiala veitingin í sjálvum sær, sum er avgerandi. Tað er hinvegin avleiðingin fyri kappingina á felagsmarknaðinum, sum er avgerandi. Um sosialar veitingar gera tað óvanliga lagaligt at reka fiskavirkir í Føroyum, er tað væl gjørligt, at hetta verður sætt sum eitt ólógligt kappingaravlagandi átak.

Við fiskimannafrádráttinum og sonevndu fiskavirkisskipanini er tað avgerandi, at landið vendir sær beinleiðis til borgaran. Um talan er um beinleiðis skattalættar og fíggjarligar ágóðar til fyritøkuna, er talan um ólógligan landsstuðul.

Statsstuðulsskipanir í ES-høpi eru eitt sera tekniskt og rúgvusmikið økið í ES-lóg-gávuni. Hvør einstøk skipan verður granskað við nærlagni, og tað er aloftast ógjørligt at siga frammanundan, hvørt ein skipan verður mett innan- ella uttanfyri markið. Limalond hava nógvar fjølbroyttar og hugflogsríkar stuðulsskipanir, ið javnan verða endurskoðaðar, soleiðis at tær júst kunnu snúgva sær undan ES-reglunum. Hesin atburður er ikki neyðturviliga við sviki fyri eyga. ES-Kommisssiónin viðger nógvar umsóknir frá limalondum um undantøk til stuðulsskipanir, men talan er um eina sera drúgva og umsitingarliga tunga mannagongd. Tí hvørvur endamálið við stuðulinum ofta, áðrenn góðkenning frá Kommissiónini kemur í lag, tí fyritøkan í umsóknartíðini annaðhvørt er farin á heysin, ella marknaðurin hevur broytt seg. Tí royna limalondini seg ofta við hugfloygdum óbeinleiðis stuðulsloysnum. Tað er tí ikki óhugsandi, at skipanir sum fiskavirkisskipanin kunnu varðveitast við ES-limaskapi, tó møguliga við onkrum hendinga tekniskum tillagingum, soleiðis, at man sleppur ígjøgnum nálareyga hjá Kommissiónini.

***45** T.d. direktiv 2003/96/EF frá 27. oktober 2003 um umskipani av EF-ásetingum um skatting av orkuvørum og ravmagni*



Hóast grá økir í stuðulslóggávuni hevur ES eina púra greiða støðu til sonevndar bjargingarpakkar til vinnuna. Bjargingarpakkar verða loyvdir, tá talan er um felags ES-bjargingarpakkar, og eru nærum púra bannaðir tá landið sjálvt fer inn og bjargar egnari vinnu. Eitt undantak, sum møguliga kann vera viðkomandi fyri Føroyar, er 'de minimis reglan'. Henda reglan fevnir um støður, har stuðulsupphæddin og stuðulstíðin eru so mikið lítlar, at tær ikki verða mettar sum kappingaravlagandi. Serligar reglur er fyri de minimis undantøk í primer-framleiðsluni í fiskivinnuni.[46] Høvuðsreglan er, at stuðul upp til 30.000 EUR í eitt trýáraskeið, verður loyvt sum de minimis undantak. Tó verða størri føroyskir bjargingarpakkar til føroyskt vinnulív t.d. ein heilan fiskiflota undir ongum umstøðum loyvdir, um Føroyar gerst ES-limur. Hetta merkir, at bjargingarpakkin, sum rækjuflotin fekk í 2005, tá ið 20 milliónir krónur vórðu nýttar at bjarga rækjuvinnuni, ikki hevði verið í tráð við ES-lóggávuna.

Tað er ein rúgva av undantøkum at finna í statsstuðulslóggávuni, og støðan hjá Føroyum sum ein lítil útjaðaramarknaður kann avgjørt nýtast til at tryggja undantøk til føroyskt vinnulív í ES-samráðingum. Tað er hinvegin púra greitt, at ein ES-limaskapur merkir, at frælsið at stuðla vinnuni verður skert munandi, um Føroyar gerst partur av ES.

Í lógini um vinnuligan fiskiskap er ásett ein avmarking í eigaraviðurskiftunum av veiðiloyvum og fiskidøgum. Talan er um eina sokallaða monopol-avmarking, sum skal forða fyri, at einstøk feløg ella persónar eiga ov stóran part av veiðiloyvunum ella fiskidøgunum. Avmarkingarnar eru hesar:

**Bólkur 1:** *Lemmatrolarar – 30% av veiðuloyvunum*
**Bólkur 2:** *Partrolarar - 20% av fiskidøgunum*
**Bólkur 3:** *Línuskip yvir 110 tons – 20 % av fiskidøgunum*
**Bólkur 4 A og 4B:** *Útróðrarbátar størri enn 15 tons – 20 % av fiskidøgunum*
**Bólkur 4T :** *Útróðrarbátar størri enn 40 tons á trolveiðu – 30 % av fiskidøgunum*
**Bólkur 6:** *Garnabátar – 25 % av fiskiloyvunum*
**Verksmiðjutrolarar:** *35 % av kvotunum í toskavirði*
**Ídnaðarskip:** *- 35 % av veiðiloyvunum*
**Uppsjóvarfiskiskapur:** *- 25 % av veiðiloyvunum*

Hesar ognaravmarkingar høvdu ivaleyst ikki verið loyvdar, um Føroyar gerast limur í ES, tí aðalmálið um at tryggja somu kappingartreytir fyri alt ES-økið, er eitt sterkt prinsipp. Limalondini kunnu ikki veita egnum vinnulívi serligar kappingarsømdir við almennum stuðli, sum avlagar kappingina á felagsmarknaðinum.

---

***46*** *Forordning 875/2007/EF frá 24. juli 2007 um nýtslu av grein 87 og 88 í EF sáttmálanum í sambandi við de minimis stuðul í fiskivinnuni og broyting av forordning 1860/2004/EF.*

*Aftan á Lissabonsáttmálan svara grein 87 og 88 til grein 107 og 108.*
*Vanliga de minimis undantakið er 200.000 EUR, men markið er lægri í primerframleiðsluni í fiskivinnuni.*



Búskaparráðið hevur fleiri ferðir víst, at tað er neyðugt at broyta bólkabýtið (sí omanfyri) í fiskidagaskipanini, tí tað er ein forðing fyri fríari kapping.[47] Búskaparráðið metir skipanina hava við sær, at fiskivinnan í Føroyum ikki er so lønandi, sum hon átti. Nýggja uppskotið til felags fiskivinnupolitikk (Art. 27) áleggur limalondum at í mista lagið býta skip í teir bólkar: yvir/undir 12 metrar. Limalondini kunnu býta í fleiri skipabólkar, men skulu boða Kommissiónini frá hesum. Við øðrum orðum er lítið, sum bendir á, at Føroyar ikki kundu varðveitt verandi býtið.

Limalond mugu bert býta loyvir eftir gjøgnumskygdum og objektivum prinsippum (Art. 28.4). Tvs. skipabólkabýtið skal kunna verjast útfrá einum objektivum stigi. Kommissiónin hevur ábyrgdina av at seta eitt felagsskipayvirlit (Art. 36.3), sum limalondini hava skyldu at veita upplýsingar til (Art. 36.2).

Í innleiðandi viðmerkingunum til uppskotið stendur at lesa (síða 7-8):
"Member States may regulate transferable fishing concessions to ensure a close link between them and the fishing communities (for example, by **limiting the transferability within fleet segments**) and to prevent speculation. To respect and maintain relative stability transferability of these concessions may be limited".

*Eftirlit*
Meðan føroyingar hava lutfalsliga smidligar skipanir, tá ið tað snýr seg um at hava eftirlit við fiskileiðum, at stongja leiðir við stórari íblanding av ungfiski og aðrar tekniskar reguleringar, er tilsvarandi skipan í ES trupul og tíðarkrevjandi. Ein av høvuðsorsøkunum er tung umsitingarlig mannagongd.

Ábyrgdin fyri fiskiveiðueftirlit í ES er tvíbýtt. Limalondini hava veiðueftirlit á heimaleiðum- og havinum. Strandalandið hevur eftirlit við, at tær teknisku ásetingarnar verða hildnar, veiðidagbøkur, veiðueftirlit umborð á fiskiførum, eftirlit við landinum o.s.fr. Flaggstaturin hevur eftirlit við heildarkvotunum hjá viðkomandi landi og hevur skyldu at steðga fiskiskapinum, tá ið heildarkvotan er fiskað. ES hevur sínumegin heimild at steðga fiskiskapinum, um veiðutølini frá limalandinum vísa, at kvotan er uppi. ES hevur harumframt eitt lið av eftirlitsfólki, sum skulu ansa eftir, at eftirlitið í limalondunum virkar til fulnar. Misnøgdin við veiðueftirlitið og hvussu tað virkar, hevur verið stór. Kjarnin í trupulleikunum er, at ábyrgdin er tvíbýtt og vantandi samskipan millum limalond og ES: Limalondini eru ikki nóg strang í sínum eftirliti, ov lítið av fíggjarligari orku er sett av til eftirlit á sjónum, og samskiftið við ES-nevndina er vánaligt.[48]

Tað er eisini ein ávísur munur á í dag, hvussu fiskiveiðueftirlitið í Føroyum virkar sammett við eftirlitið hjá ES. Fiskiveiðueftirlitið í Føroyum rapporterar í dag, hvat skipini hava veitt, og ikki hvat tey landa. Eftirlitið hjá ES rapporterar hinvegin landingar. Gerast Føroyar limur í ES verður neyðugt at samskipa hetta.

**47** *Búskaparráðið, frágreiðing á vári 2011, s. 25*

**48** *Et market for Fisk? Om EFs fiskeripolitikk og norsk fiskerinæring, s. 76*



*Menningarstuðul*

ES-studningurin til bygnaðartiltøk í fiskivinnuni hevur til endamáls at fáa varandi og burðardygga javnvág millum tilfeingi og veiðuorku: At bøta um kappingarførið, menna lønandi fyritøkur í fiskivinnuni og at bøta um tilgongdina og tilvirkingina av fiski- og havbúnaðarvørum. Fyri at røkka hesum málum verður í løtuni veittur stuðul til ymisk átøk.

- *Til upphøgging*
- *Endurnyggja flotan*
- *Royndarfiskiskap*
- *Útbyggja fiskaríhavnir*
- *Joint ventures við triðjalond*
- *Alivinna*

Treytin at fáa stuðul úr menningargrunninum hjá ES er, at limalandið sendir ES eina nasjónala vinnuætlan og umsókn um stuðul. Treytin fyri at fáa stuðul úr menningargrunninum fyri fiskivinnuna er, at limalandið eisini leggur til. Her kann talan vera um stuðul, sum svarar til úr 5% upp til 50% av íløgukostnaðinum.

Fáa Føroyar atgongd til menningargrunnin, er óvist, hvørjir partar av føroyskari fiskivinnu høvdu fingið stuðul. Kortini er gjørligt at fáa pening til at upphøgga gomul fiskifør í føroyska flotanum. Fyri nøkrum árum síðan fingu tey stóru uppsjóvarskipini í Hirtshals nógvan stuðul úr ES til samanleggingar fyri at minka um $CO_2$ útlátið. Hetta merkir við øðrum orðum, at topmodernað skip í føroyska uppsjóvarflotanum høvdu havt møguleika at fáa stuðul úr menningargrunninum.

Sum áður nevnt, er ES tó í ferð við at broyta hesa skipan, og hvørjar treytirnar og møguleikarnir eru fyri at fáa stuðul.

*Tollurin fellir burtur*

ES-lond hava í nógv ár havt sínamillum fríhandil við fiski og fiskavørum. ES hevur, síðan FFP kom, havt skipanir, sum hava vart ES-marknaðin móti innfluttum fiski og fiskavørum úr triðjalondum. Her hevur serliga verið talan um toll á fiskavørum. Fyri frystar og feskar fiskavørur er triðjalandstollurin millum 8 og 15%, fyri fløk millum 12 og 18% og fyri viðgjørdar fiskavørur millum 20 og 30%. Høvuðsreglan hevur verið og er, at tess meira fiskurin er tilvirkaður, tess hægri eru tollsatsirnir.[49]

Í dag er 95% av øllum útflutningsvirðinum hjá Føroyum fiskavørur, har alivinnan er vorðin ein týðandi og alsamt vaksandi partur av samlaðu føroysku fiskaframleiðsluni. ES er protektionistiskt, tá ið tað kemur til innflyta fisk. Kortini hava Føroyar eina rímuliga góða handilsavtalu við ES. Núverandi fríhandilssáttmáli Føroya við ES kom í gildi í 1997, og gevur Føroyum sera rúmsátt frælsi at handla frítt við vørum við ES og umvent. So at siga allar vørur eru fevndar av fríhandli - Føroyar hava í roynd og veru givið ES fullkomnan fríhandil, meðan tað eru nakrar avmarkingar hinvegin á fiskavørum.



**49** *Reyða álitið s. 91*

Síðani fyrstu formligu fríhandilsavtaluna millum Føroyar og ES frá 1991 er handil við fiskavørum gjørdur alsamt fríari. Øll kvotuloft eru burtur, og alsamt fleiri vørur hava 0 toll ella avmarkaðan toll í mun til vanliga triðjalandstollin. Føroyar hava sostatt í fleiri førum nógv betur sáttmála enn onnur triðjalond.[50] Dømi um hetta eru Kapittul 0301 – 0307 og ávísar vørur í kapittul 16 í fríhandilssáttmálanum; feskur ella kaldur fiskur er stórt sæð tollfríur; frystur fiskur er tollfríur á øllum týdningarmiklum økjum fyri Føroyar. Nevnast skal, at fryst hýsa kom á listan í seinnu helvt av 2006, og liðugt framleidd vøra hevur í mongum føri 0 toll – serliga á týdningarmiklum økjum fyri Føroyar.

Tað eru í dag bert fýra vørubólkar, av teim vørum sáttmálin fevnir um, ið enn eru fyri forðingum. Hesir eru: Pilkaðar rækjur á 3000 tons (tilsøgn er komin frá ES um, at kvotan hækkar stigvíst til 6000 tons eftir ynski úr Føroyum.) síl, kvota 700 tons, niðursjóðaður laksur, kvota 400 tons - annað niðursjóðað, kvota 1200 tons. Gerast vit limur í ES, so fella tollforðingarnar púra burtur.

Limaskapur hevði givið føroyskum vørum frælsa atgongd til evropeiska marknaðin. Harafturat hevði verið sloppið undan anti dumping, ið serliga føroyska alivinnan ber ótta fyri. Alivinnan er í dag tann vinnan, ið ivast mest í verandi støðu, ikki orsakað av tollforðingum, men tí hon stúrir fyri, at verjutiltøk kunna verða sett í verk móti føroyskum laksaútflutningi.

Við limaskapi høvdu vit eisini komið burtur frá stríðnum um at broyta positivlistan til ein negativlista. Verandi mannagongd við positiva lista heldur fast í verandi handilsmynstrið, meðan tað í verki hevur gingið striltið at leggja nýggjar vørur aftur at positivlistanum ella at økja um verandi tollkvotur, svarandi til broytingar í útboði. Føroyar hava í fleiri førum skotið upp at broyta positivlistan til ein negativlista.

***50*** *www.tinganes.fo*



# 6. Keldur


Guide to EUs Fisheries Policy:
*http://ec.europa.eu/fisheries/documentation/publications/pcp2008_en.pdf*

***Den fælles fiskeripolitik i tal***, statistiske nøgletal, udgave 2012

Lógin um vinnuligan fiskiskap

Frágreiðingin hjá Búskaparráðnum á vári 2011

Gula álitið, Føroyar og ES – møguleikar og avbjóðingar í framtíðar samstarvi, 2010

Bláa álitið, Møguleikar fyri samvinnu við Evropeiska Samveldið, 1995

EF og Færøyene, Forvaltning av fiskeressurser og utveksling av kvoter 1977-1989, Jens Helgi Toftum, Fiskerikandidatopgave1990

Iceland, Norway and EC Common Fisheries Policy, Tenketank Europa, 2003

Et marked for Fisk, Om EFs fiskeripolitikk og norsk fiskerinæring,
Petter Holm (red.), 1993

Nordic experience of fisheries management- Seen in relation to the reform of the EU Common, *Søren Eliasen and Sten Sverdrup-Jensen Aalborg University*
*Petter Holm and Jahn Petter Johnsen, University of Tromsö, Nordic Council, 2009*
Fisheries Policyhttp://ec.europa.eu/fisheries/reform/docs/nordic_council_02_en.pdf

The Evolution of the Common fisheries Policy, working paper, Lukas Schweiger, 2010
http://eif.univie.ac.at/downloads/workingpapers/wp2010-07.pdf

Nøgdir og nýbrot, føroysk fiskivinnumenning í fimmti ár,
Dennis Holm og Bogi Mortensen, 2008

WTO eller EU-medlemskap, Norsk fiskerinæring og Eus handelsr., Arne Melchior, 2010
http://www.nupi.no/content/download/1439/38986/version/7/file/Norsk+fiskerinæring+og+EUs+handelsregime+(2).pdf

Frágreiðingin hjá Búskaparráðnum, september 2013
http://buskap.fo/resources/2/BUSKAPARRAD_sept_2013(endalig).pdf
Heimasíðan hjá danska Fødevareministeriet:
http://fvm.dk/fiskeri/eus-fiskeripolitik/

Ja til Evropa s. 75

Et market for Fisk? Om EFs fiskeripolitikk og norsk fiskerinæring, s. 42

Den fælles fiskeripolitik – en bruger vejledning, s. 6






# JAVNAÐARFLOKKURIN
# á Fólkatingi

**MAI 2014**